# FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 353 Hósdagur 27. oktober 2005 12,-





KÄRCHER

Vit eru einaumboð fyri **KÄRCHER** trýstspularum til ídnað.

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42

Vit umvæla eisini






P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo


Sofus Poulsen 2. partur:

## Havn undir krígnum

Síða 9



Síða 11

## Á landsfundi hjá Norges Fiskarlag

Á slíkum fundi sæst neyva sambandið millum føroyingar og norðmenn.





M ELECTRIC
Hoyvíksvegur 53 · tel 35 12 20 · www.lm.fo


Maiken:

## Av løgmans-skrivstovuni til Álands

Maiken hevur tænt sjey løgmonnum. So kom ein álendingur uppí leikin...



Síða 16

## Magnetur sparir 10% av oljunýtsluni

Góð tíðindi í hesum dýru oljutíðum.

Síða 17

## Minningarhald

fyri teimum sum fórust bardagaárini

Síða 20



Vit hava nøvnini á teimum 210, sum mistu lívið á sjónum bardagaárini og nógv annað tilfar frá bardagatíðini.


# 3 nætur í Reykjavík

**Fríggjadag til mánadag á Hotel Ørkini**
**Kr. 2.490,- fyri hvønn**

Íroknað prísin: Flogferð Vágar - Reykjavík og aftur við ferðaavgjaldi,
3 nætur á Hotel Ørkini í dupultkamari við morgunmati.
Eyka fyri einkultkamar kr. 250,-

**Prísur fyri hvønn**
**2.490,-**

Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 312 600 | FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 | FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annan-hvønn hósdag**

# Umborð á nýggja "Smyril"

Nú hevur so nógv verið skrivað um nýggja "Smyril", at tað er ikki so nógv vit kunnu leggja afturat.

Men vit vóru á kajuni, tá skipið kom á Havnina leygardagin, og hópur av fólki var fyrst á bryggjuni og síðan umborð. Talan er um eitt stásiligt skip, og vit fara seinni at endurgeva grein úr Hugbirtingum hjá Petur Háberg um gamla "Smyril", sum kom í 1932. Her kemur at fáast ein ábending um, hvussu stórur munurin er.

Vit vóru umborð og hittu onkran.



*Eina ferð vóru 7 systrar í Nólsoy í einum húsi. Men so hendi tað, at fimm av teimum giftust til Suðuroyar. Fýra í Sandvík og ein í Hvalba. Og tvær av teimum, Olgu og Randi, hittu vit umborð hendan dagin. Tær hava siglt við "Smyril 1", og nú skulu tær við hesum nýggja farinum. Tær eru samdar um, at her er talan um eitt veldugt framstig, og vit vilja ynskja manningini góða eydnu við teirra nýggja arbeiðsplássi!*



*Hetta eru tríggir rættir hvalbingar. Uttast t.v. er 80 ára gamli Dánjal Norðberg. Hann hevur roynt aðrar tíðir enn hesar við samferðslu. Tá hann var ungur var eingin vegur til Hvalbiar, so farast mátti til gongu yvir fjøll til Tvøroyrar ella Sandvíkar, tá tað ikki lá fyri at sigla. Dánjal minnist næstfyrsta "Smiril", sum legði legði inn á Hvalba á ferðini til og úr Havn. Ferðin til Havnar tók vanliga meginpartin av einum degi.*

*Næstur honum er Dávur Holm Jacobsen, sum lítið og einki kennir til hesi viðurskifti. Hann er meistari við "Smyril", og hann hevur mestsum búð í Spania nú í fleiri ár, tí hann er ein av teimum, sum hevur havt eftirlitið við byggingina av "Smyrli". Uttast til høgru Arnold Eivindsson, sum er lærari í Havn, og sum er ein av teimum sum væntandi javnan fer at nýta "Smyril".*

## Gullbrúdleyp

Tann 19. november hava Marna og Jákup Joensen á Eiði gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í ítróttarhøllini á Eiði sama dag. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í gullbrúdleyp, kunnu siga frá á

tlf. 42 30 78 – 72 30 78
ella á teldupost mj_gullbr@yahoo.dk

innan 10. november.

**100% tryggleika?**





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur • 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

# Jólapostur 2005

Jólapostur til grannalondini eigur at vera í seinasta lagi á posthúsinum í Tórshavn:

| | Flogpostur | | Skipspostur | |
|---|---|---|---|---|
| | Brøv | Pakkar | Brøv | Pakkar |
| Bretland | 16.12 | 15.12 | 01.12 | 01.12 |
| Danmørk | 19.12 | 19.12 | 15.12 | 15.12 |
| Finnland | 16.12 | 16.12 | 08.12 | 08.12 |
| Grønland, Nuuk | 16.12 | 16.12 | 17.11 | 17.11 |
| Ísland | 16.12 | 16.12 | *senda ikki við skipi* | |
| Noreg | 19.12 | 12.12 | 08.12 | 08.12 |
| Svøríki | 16.12 | 16.12 | 08.12 | 08.12 |

Veðrið kann darva postflutningin. Sendið tí postin í góðari tíð.

Freistirnar eru eisini at síggja á www.postur.fo. Upplýsingar um seinastu freistir til onnur lond og nærri upplýsingar um freistirnar til aðrar býir í Grønlandi eru at fáa á størstu posthúsunum.

Innlendis
Jólapostur til móttakarar í Føroyum eigur at vera latin inn í seinasta lagi:

mikudagin 21. desember.

Tollgreiðsla
Tað er sera umráðandi fyri skjóta tollgreiðslu í móttakaralondunum, at vøruinnihaldið (gávurnar) í sendingunum verður skrivliga útgreinað á tollsøgnina.

Matvøra
Avmarkingar eru, tá matvøra skal sendast til útheimin. Upplýsingar eru at fáa á posthúsunum, um hvat og hvussu nógv kann sendast í hvørjum pakka.

Tilskriftarleysar sendingar í desember
Tilskriftarleysar sendingar kunnu sendast uttan eykakostna. Gjøldini og vanligu reglurnar eru at finna á www.postur.fo.

Postverk Føroya ynskir øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár

Postverk Føroya

Viðmerking frá Eyðun Simonsen:

# Millumbylgjusendarin

Undirritaði var ein av nýggju, ið hevði eina viðmerking í bløðunum um millumbylgjusendaran. Eg skal her royna at greina nøkur mál, ið møguliga kunnu misskiljast, eftir at Bjarni Djurholm hevði grein í bløðunum seinasta vikuskiftið.

| | Akraberg fj. | Akraberg km. | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| Skagen | 580 fjórðingar | 1074 km | Hoyrist hampuliga væl** |
| Lindesnes | 486 fjórðingar | 900 km | Hoyrist væl* |
| 35 gradir vestur/59 gradir norður | 850 fjórðingar | 1600 km | Hoyrist hampuliga væl** |

* Merkir at tú kanst lurta uttan at vera noyddur at kýta teg á nakran hátt. Tú kanst v.ø.o. fáast við okkurt annað meðan tú lurtar.
** Merkir at tú ikki kanst fjasast við alt ov nógv annað uttan at missa tráðin.

Havi siglt í fastari rutu millum Danmark og Grønland í 10 ár, og mínar royndir eru, at ÚF hoyrist nógv longur, enn Bjarni Djurholm vil vera við (sí talvu).

Upplýsingarnar í talvuni eru royndir hjá mær sjálvum og nøkrum av mínum starvsfeløgum.

ÚF hoyrist sostat tvífalt so langt sum ITU (International Telecomunication Union) sambært Bjarna Djurholm sigur. ITU hevur uttan iva okkurt minsta mál fyri, hvussu sterkt signalið skal verða fyri at telja við. Men tað bilar einki, um tað skróðar eitt sindur í. Sjófolk krevja ikki stereogóðsku.

Bjarni Djurholm skrivar, at órógv er mest ein trupulleiki um náttina. Tá man sigur, at rúmbylgjan er ein trupulleiki um náttina, meinar mann frá sólsetur til sólarris.

Ta myrkastu tíðina, um okkara leiðir, setur sólin longu um trítíðina seinnapart og rísur um tíggjutíðina fyrrapart. T.v.s. at náttin er einar 18 tímar, tá ringast vil til.

Mann skuldi trúð, at við einum 25 kW sendara verður trupulleikin við óljóði nógv størri.

Tað verður sum at teska inni í eini ítróttarhøll móti endanum av einum jøvnum hondbóltdysti.

Ein Føroysk fjarskiftisfyritøka bjóðar sær at senda tíðindi til skip, um fylgisvein. Men tað krevur, at skipið hevur útgerð til at taka niður fylgisveinasjónvarp, og henda útgerð er sera dýr.

Eg haldi, at tað er í so nógv avgjørt at kalla hetta tilboð "internet" sum Bjarni Djurholm kallar tað. Talan er um at senda og móttaka data, í einum, einaferð um samdøgrið. Fyritøkan lýsur við, at man fær tíðindir "uttan at fara á internetið"!!!

Tað sigur ikki so lítið, at tað kostar 1.400 kr. um mánaðan bara at taka niður ÚF beinleiðis.

Um so er, at landið ikki hevur ráð til ein millumbylgjusendara, ið hoyrist víða, so er bara at siga sum er, ístaðin fyri at pakka tað inn í eina umbering um, at tað ikki hevur nakran týdning at minka sendiorkuna niður í 25kW!

Men fyri at ikki alt skal enda við munnhøggan um kilowatt, kilometrar, óljóð og hoyrilíkindir, so vil eg mæla til at Føroya Tele, sum eina roynd, skrúvar niður fyri núverandi sendara so hann sendir við 25kW. So verður sjón fyri søgn.

Tá tað letur seg gera at skrúva millum 200kW og 100kW, so man eisini vera møguligt at skrúva longur niður.

Tá kann Tingið taka avgerð út frá veruligum royndum. Og ikki bert einum matematiskum modelli frá ITU.

**Vinarliga**
Eyðun Simonsen,
Hoyvík.

Tíðindaskriv frá Føroya Lívstrygging:

# P/F Íløgufelagið Royndin

Føroya Lívstrygging hevur sett á stovn eitt íløgufelag. Navnið á felagnum er Íløgufelagið Royndin. Felagið er stovnað við einum eginpeningi upp á 20 mió.kr. Endamálið við felagnum er sum framtaksfelag at gera íløgur í ymisk vinnuvirksemi. Fyri at halda rakstrarútreiðslurnar á einum so lágum støði sum gjørligt, verður raksturin av íløgufelagnum í byrjanini samskipaður við rakstrurin hjá Føroya Lívstrygging.

Í nevndina eru vald Poul Hansen, Súsanna Sørensen og Tummas Eliasen. Stjóri er Tummas Eliasen.

Tað er sum ein partur av langtíðaríløguætlanini hjá Føroya Lívstrygging, at Íløgufelagið Royndin verður stovnað. Eins og hjá flest øllum eftirlønarfeløgum er størsti parturin av íløgunum hjá Føroya Lívstrygging í lánsbrøvum. Tó verða eisini íløgur gjørdar í partabrøv. Hesin parturin hevur tey seinastu árini verið umleið 5% av teimum samlaðu íløgunum. Í hesum árinum eru íløgurnar í partabrøv øktar nakað, soleiðis at uml. 8-10% – svarandi til uml. 180 mió. kr. – av samlaðu íløgunum við ársenda 2005 verða í partabrøv. Tað snýr seg her um altjóða partabrøv, sum øll eru skrásett á virðisbrævamarknaðum og tí eru lætt umsetilig og hava eina neyva virðisáseting.

Virksemið, sum Íløgufelagið Royndin kemur at hava, vil í stóran mun vera íløgur í partabrøv og møguliga sum ábyrgdarpeningur í føroyskum feløgum, sum ikki eru skrásett á einum virðisbrævamarknaði. Hetta er ein orsøkin til, at hesin parturin av íløguvirkseminum hjá Føroya Lívstrygging verður lagdur í eitt sjálvstøðugt felag. Á henda hátt fæst ein greiðari skilnaður millum virksemið hjá Føroya Lívstrygging og virksemið hjá Íløgufelagnum Royndini.

Íløguvirksemið hjá Føroya Lívstrygging er vaksið nógv tey seinastu árini, soleiðis vóru samlaðu íløgurnar í 1995 á leið 750 mió.kr. og við ársenda 2005 koma samlaðu íløgurnar at nærkast 2 mia.kr.

Tann peningur, sum verður settur í hetta felag, er sostatt uml. 1% av teimum samlaðu íløgunum hjá Føroya Lívstrygging. Alt í mun til, hvussu stórur áhugin hjá vinnulívinum verður fyri at gera nýtslu av hesum tilboði frá Íløgufelagnum Royndini, verður støða tikin til, um Føroya Lívstrygging skal seta meira pening í felagið. Tað er sjálvsagt eisini treytað av, at íløgan gevur nøktandi vinning.

**Tórshavn, tann 20. oktober 2005**

Føroya Lívstrygging
Tummas Eliasen, stjóri

**Býtið av íløgum hjá Føroya Lívstrygging í 1995 og frá 2000-2004**

| Mió.kr. | Lánsbrøv | Partabrøv | Fastogn | Útlán | Innlán | Onnur aktiv | Aktiv |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1995** | 248 | 15 | 8 | 307 | 159 | 10 | **747** |
| **2000** | 849 | 154 | 14 | 57 | 110 | 8 | **1.192** |
| **2001** | 941 | 173 | 14 | 48 | 88 | 12 | **1.275** |
| **2002** | 1.133 | 76 | 14 | 24 | 157 | 19 | **1.423** |
| **2003** | 1.338 | 84 | 14 | 36 | 64 | 15 | **1.553** |
| **2004** | 1.524 | 84 | 14 | 35 | 85 | 20 | **1.763** |

Fiskimálaráðið
FISKIVINNU GRANSKING

## Fiskivinnuroyndir 2006
Lýsing eftir umsóknum

Fiskivinnuroyndir er ein játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar gransking og menning innan fiskivinnu:

Verkætlanir innan fylgjandi øki hava fyrimun:
- Fiskiskapur við ábyrgd
- Royndarveiða, framleiðsla og søla
- Virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, trygd og umhvørvi

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Serligur dentur verður lagdur á, at verkætlanir kunnu vísa á, at tær hava vinnuna við í verkætlanini, hava góða eginfígging ella aðra fígging og kunnu vísa á møguligt samstarv við samstarvsfelagar í Føroyum og uttanlands.

Víst verður á, at møguleiki er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu øki.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi týsdagin 15. nov. 2005 kl. 12.00.

Meira fæst at vita:
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2006.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 21 73 69
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:

Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn

Klaksvíkar Sjúkrahús
FO-700 Klaksvík

## Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur

Ortopædkirurgiskur skómakari & bandagistur frá SAHVA verða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 8. og 9. november 2005, og á Landssjúkrahúsinum 10. november 2005.

Tíð fæst við at ringja á tlf. 45 54 63, mánadag og týsdag kl. 10-12, í seinasta lagi týsdagin 1. november 2005.

Vit hava útgerðina



Flótitrol | Snurpunótir
Botntrol | Aliútgerð
Rækjutrol | Annað

VÓNIN

Høvuðsskrivstova:
Bakkavegur 22
530 Fuglafjørður
Telefon 474 200
Telefax 474 201

Tórshavn:
Vestara bryggja 12
100 Tórshavn
Telefon 35 43 91
Telefax 31 33 19

info@vonin.com - www.vonin.com

Nýggj bók:

# Dávur í Tjørnuvík



Í næstum kemur út ævisøga hjá tí 94 ára gamla Dáva í Tjørnuvík, sum røkkur frá 1911-1937. Tann sum hevur skrivað er Sveinur Ísheim Tummasson.

Tað er kent, at Dávur er væl skorin fyri tungubandið, men sigast skal eisini, at tað má vera eitt ótrúligt minni hann hevur. Bókin er 240 síður, og her greiðir Dávur ikki bert frá sínum lívi, men frá øllum møguligum viðurskiftum í ætt, bygd og annars í sínum øki í Norðurstreymoy.

Hetta er ein rættiligur dýrgripur hjá teimum, sum hava áhuga fyri slíkum. Ein maður, sum prátar so nógv sum Dávur, hevur eisini detaljurnar við. Og hesar verða meira virðismiklar at fáa varðveittar fyri eftirtíðina, enn tær verða mettar av samtíðini. Tí eru tær ein fongur.

Komið í hálva bókina fer Dávur til skips við Havgásini úr Vági. Og so fáa vit skipslív og heimalív, sum tað var hjá so mongum, men tó ikki er eins fyri tveir, og tí er hetta eisini áhugavert. Bókin er skrivað til minnis um tveir vinmenn hjá Dáva. Annar var Poul Johannes Davidsen, sum doyði av tuberklum í 1935, bert 24 ára gamal. Og hin var Johan Hendrikk Heinesen (Henge), sum druknaði við Ernestinu í 1930 bert 20 ára gamal. Soleiðis var lívið tá. Júst frásøgnina um Henga hava vit havt her í blaðnum. M.a. um tá feðgarnir báðir saman við øðrum hingu í vantunum á Ernestinu hesa kavaroks- og ódnarnáttina, teir vóru farnir á eitt sker á Suðurlandinum. So kemur eitt óløgi og tekur Henga við sær. Hann rópar neyðarróp eftir pápanum, sum einki kundi gera. Hann rópar aftur: "Pápi kemur skjótt", og hann var eisini tann næsti sum fór. Hetta er bert eitt dømi um ta neyð føroyskir fiskimenn hava verið í. Tað ber illa til at ímynda sær, hvat tað má hava staðið á einum pápa í slíkari støðu.

Dávur hevur sum aðrir haft tað buldrasligt á sjónum. Nakað seint í bókini greiðir Dávur frá, tá hann var við "Coraliu" ta tiltikni ferðina, teir bjargaðu manningini á "Blithsome".

Víst dugur Dávur at greiða frá. Og tað verður stuttliga at fara at lesa bókina í friði og náðum. Tað eru eisini nógvar áhugaverdar myndir í bókini.

Bókin er eitt virðismikið íkast til okkara bygda- og fiskimannasøgu.

*ó.*




Í næst seinasta blaði høvdu vit eina stuttliga mynd frá 1948 av Pola skómakaranum og Berint Gregoriussen. Søgan aftanfyri myndina var ikki minni stuttlig. Hon var í stuttum, at Mats Brisenfeldt og Katrin Johansen vóru hjá fotografi at taka brúðarmynd. Tá vísti tað seg, at pápi fotografin hevði verið í Føroyum í 1948 og hevði tá tikið myndir. Hann tók tvær við sær, sum hann vísti Elmu, mammu Katrin. Tá vísti tað seg, at abbi hennara, Poli, var á aðrari myndini.

Hesa ferð prenta vit hina myndina sum Elma fekk. Tað sær út sum at fólk koma úr kirkju. Hvørji munnu fólkini vera? Latið okkum frætta.

Tíðindaskriv frá postverkinum:

## Tollfríar gávusendingar við postinum til Føroya

Postverkið gleðist um, at tað nú hjá kundum ber til at senda gávusendingar við virði upp til 700 kr. við postinum úr Danmark og øðrum londum til Føroya uttan at tollur verður lagdur á tær.

Sambært rundskrivi frá Toll- og Skattstovu Føroya um gávusendingar, eru gávupakkar, hvørs tollur lítið og einki hevur at týða, undantiknir tolli og avgjaldi. Heimildin til hetta undantak er í § 6, litra h í tolllógini, jbr. § 27 stk. 3 í MVG-lógini.

Víðari stendur í rundskrivinum: Tollur og avgjald skal ikki gjaldast fyri vørur, sum verða sendar frá einum privatpersóni uttan fyri Føroyar til ein privatpersón í Føroyum, tá ið talan er um gávupakkar, og innflutningurin er uttan vinnuligt endamál.

Innflutningur uttan vinnuligt endamál er at skilja sum sendingar, ið:
- bert eru av og á, t.d. føðingardagsgáva, jólagáva o.t.
- bert fevna um vørur, ið eru ætlaðar til móttakaran sjálvan ella familju hansara at nýta, og hvørs eginleikar ella nøgd ikki kunnu geva høvi at ivast í, at innflutningurin fer fram við endamáli, ið ikki er vinnuligt
- verða sendar móttakaranum uttan at hann á nakran hátt skal gjalda fyri sendingina

Frítøkan er galdandi fyri vørur, sum **í mesta lagi hava eitt virði á kr. 700, fyri hvørja gávu.** Um virði á eini vøru fer upp um hesa upphædd, skal tollur og avgjald gjaldast fyri fulla virði á vøruni. Frítøkan er ikki galdandi fyri vørur sum innihalda alkohol og tubbaksvørur.

Tað er tó framvegis sera umráðand fyri skjóta tollavgreiðslu, at sendarin á eina tollsøgn, sum skal fylgja við postsendingini, skrivar, hvat er í sendingini. Har skal í minsta lagi standa nakað um nøgd, slag og virði á innihaldinum. Á hendan hátt verður tollviðgerðin løtt og skjót.

FF-blaðið www.fiskimannafelag.fo
Gerst haldari fyri einans 50 krónur um ársfjórðingin




**Vit framleiða:**

Flótilínu ◆ Spunpolyesterlínu ◆ Reyða línu
Terylene/Danlinelínu ◆ Reina Terylenelínu
Hvítar, reyðar, bláar og svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast órippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

***◆◆◆vælkomin inn á gólvið***

**SNØRISVIRKIÐ**
**í Klaksvík**
**Tel. 455254 - Fax 457254**
**www.snorisvirkid.fo**

**TEYMAVIRKIÐ**
**í Runavík**
**Tel. 473000 - Fax 473001**
**www.teymavirkid.fo**

VASTI 457171

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A



## Val til eldraráðið

Sambært býráðssamtykt frá 23. juni 2005 skal Eldraráð veljast í Tórshavnar kommunu.

Eldraráðið, sum hevur 5 limir og 5 varalimir, ráðgevur kommunustýrinum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa.

Val til Eldraráð er 4. hvørt ár fyrstu viku í oktober, hesa ferð tó síðstu viku í november, og situr fyrsta ráðið frá 1. januar 2006 til 31. desember 2008.

Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skrivliga boð um hetta í seinasta lagi 1. november 2005, kl. 16.00, hjá valnevndarformanninum ella kommununi. Saman við valevnisfráboðanini skulu undirskriftir fylgja við hjá í minsta lagi 5 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið.

Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.

Valevnislistar at fylla út fáast í Snarskivuna ella á heimasíðuni www.torshavn.fo.

Valbæri og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár.

Atkvøðurætt hava bert tey, sum standa á vallistanum.

Valið fer fram við brævatkvøðu, og verður atkvøðuseðil sendur øllum borgarum, ið standa á vallistanum.

Brævatkvøðurnar skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 29. november 2005, kl. 12.00.

Valið verður síðani alment uppgjørt sama dag, kl. 17.00, á torginum í Snarskivuni.

Um veljari hevur ikki fingið atkvøðuseðil, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

*Valnevndin fyri Eldraráðið*



w w w . t o r s h a v n . f o

# Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- ***avrúsan og viðgerð***
- ***einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)***
- ***samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)***
- ***eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi***

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

## Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***
**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

w w w . F I S K I M A N N A F E L A G . f o

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA



60 ár síðan bardagalok:

# Krígssiglarar verða bodnir til døgurða

Sum greitt frá aðra staðni í blaðnum, verður komandi minningardagur teirra sjólatnu, 1. november, eisini ein serstakur minningardagur fyri teir av okkara sjómonnum, sum lótu lív undir 2. heimsbardaga 1939-45.

Beinleiðis orsøkin til hetta serliga minningarhaldið er, at tað í ár júst eru liðin 60 ár síðani bardagin endaði. Tann 5. mai er almenni frælsisdagur Danmarkar, og tann 8. mai gjørdist frælsisdagurin hjá Europa. Hetta var dagurin, tá ið Týskland gav seg yvir. Um allan heim var 60-ára dagurin fyri krígslok markeraður við hátíðarhaldum av ymiskum sløgum. Minningarhald vóru til heiðurs fyri teir, sum lótu lív í bardaganum fyri okkara frælsi.

Í Føroyum fór hesin 60-ára dagurin framvið, uttan at hann í heila tikið varð tikin upp á tungu og uttan at nakað varð gjørt burtur úr. Tó skal nevnast, at ísfiskatúrurin hjá "Jóhonnu", sum fyrst fór upp til Íslands at keypa fisk og síðan til Aberdeen at selja, var eitt framúr tiltak, sum eisini á ein serligan hátt var eitt minni um okkara fiskimenn, sum sigldu hesa leið undir 2. heimsbardaga.

Men nú fara vit at royna at bøta um hetta. Roknast má við, at teir menn, sum vóru við í hesum hendingum, fara at eldast, so spurningurin er, um nakar merkisdagur verður aftur, har teir allir kunnu vera við.

Vit hava tískil, saman við Hini Føroysku Sjómansmissiónini og Føroya Bisp, avrátt, at komandi 1. november, umframt at vera minningardagur fyri teir, sum eru farnir í sínum virki á sjónum í ár, eisini skal vera ein serligur minningardagur fyri teir, sum doyðu á sjónum bardagaárini.

Vit ynskja tí henda dagin – 1. november – at bjóða teimum, sum sigldu undir krígnum, til ein døgurða á Sjómansheiminum, Hotel Tórshavn (sí lýsing á síðu 19). Sjómansheimið hevði nevniliga eisini sín týdning sum savningarstað hjá okkara siglandi monnum, tá teir vóru í landi, sum tað eisini hevur verið umrøtt her í blaðnum.

Skráin er samskipað, so tað skal liggja fyri at vera við til øll tiltøkini. Vanliga minningarhaldið, sum plagar at vera á sjómansheiminum, er hesa ferð flutt frá at vera kl. 10 til at vera kl. 15. Her fara Heri Joensen, prestur og løgmaður at halda røður. Aftaná verður farið niðan til minnisvarðan í viðalundini, har løgmaður leggur krans. Hesin minnisvarðin er júst reistur fyri at minnast teir, sum doyðu á sjónum undir krígnum, og nøvnini á teimum standa á minnisvarðanum. Í ár eru annars 50 ár síðani at hesin minnisvarðin varð reistur.

Eisini verður høvi at fara til minningargudstænastu í Havnar Kirkju, sum eisini verður merkt av teimum 60 árunum síðan krígslok. Tað verður Bergur Debes Joensen, sum fer at prædika.

Aftaná gudstænastuna verða øll kirkjufólkini boðin oman á sjómansheimið til ein drekkamunn. Vit halda hetta vera eitt áhugavert tiltak, og vit vóna, at flestir av okkara gomlu krígssiglarum fara at møta saman við konum. Einkjur eftir teir, sum eru farnir, eru eisini vælkomnar.

Vit royna eisini í hesum blaðnum at gera nakað burtur úr hesum. Vit fara at prenta nøvnini á øllum teimum, sum mistu lívið á sjónum undir bardaganum. Hetta er eitt skakandi høgt tal, nevniliga omanfyri 200 mans í besta aldri.

### Tilfar um bardagatíðina

Vit hava eisini annað tilfar frá hesi tíðini. Tilvildarliga hava vit júst í blaðnum í dag annan part av frásøgn hjá Sofus Poulsen – okkara "gamla" umboðsmanni í Aberdeen – um júst hesa tíðina.

Annars hava vit í ár havt nógv tilfar um bardagaárini. Hetta tilfar stavar fyrst og fremst frá okkara luttøku á minningarhaldinum í Newcastle tann 8. mai fyri danskar og føroyskar sjómenn, sum fórust undir krígnum. Vit hava havt frásagnir frá bæði donskum og føroyskum sjómonnum, og tær vísa á, hvussu ótrúliga vandamikil henda sigling var, og eisini á, hvussu tað sum við einum undri eydnaðist mongum sjómanni at verða bjargaður. Men fyrst og fremst síggja vit, at her hevur verið talan um menn í orðsins rætta týdningi.

Afturat hesum høvdu vit í summar eina hugvekjandi frásøgn hjá Honnu Ben Yami, ið vaks upp sum týskur jøði í Berlin í nasistatíðini. Hon greiddi sera væl frá muruni í nasismuni frá tí hon minnist og inntil hon sjálv fekk ferðaboð til Auschwitz og varð bjargað av einum eingli, sum hon sjálv tók til.

Vit hava eisini seinnu árini havt fleiri frásagnir um, hvussu fólk upplivdu hesa tíðina í Føroyum. Vit hava tosað við menn, sum sigldu undir krígnum, vit hava tosað við konur, sum vóru heima. Vit hava tosað við mann, sum var við í danska frælsisbardaganum. Vit hava greitt frá norðmonnum, sum komu higar, tí teir flýddu undan týskarum o.s.fr. Vit hava á hendan hátt kunnað givið eina rættiliga livandi mynd av, hvussu hendan tíðin var. Og vit hava enn meira tilfar eftir, sum ikki hevur verið frammi fyrr. Tey, sum hava áhuga fyri hesum tilfari, sum annars eisini finst á okkara heimasíðu, kunnu siga okkum frá.

Í komandi blaði fara vit at greiða frá minningarhaldinum.

# Góð reklama fyri Atlantic Airways

Vit rendu okkum fram á hendan stubban í Jydske Vestkysten 20. september. Vit halda, at hann talar fyri seg.



## Gode gamle fly-dage

! PÅ DEN 2. SIDE

Af Hans Jørgensen
tlf. 75420100,
hjo@jv.dk

Drømte jeg, eller var jeg vågen?

Kan man overhovedet kalde det for de gode, gamle dage, når der er tale om flyhistoriens relative korte åremål?

Sagen var i al sin enkelthed, at jeg sad i et firemotorers jetfly over Sjælland, der forsvandt under os. Vi var lige lettet fra Kastrup, da stewardesserne som det sig hør og bør begyndte på deres arbejde efter den obligatoriske demonstration af sikkerhedsudstyret.

Der blev serveret en, som det hedder, let anretning. Let var den. Den fyldte i hvert tilfælde ikke meget på det i forvejen lille bord, der som i alle fly er monteret på sædet foran. Men delikat så den ud, og det viste sig rent faktisk, at den smagte godt modsat mange andre lette flyanretninger.

En anden stewardesse kom med drikkevarer. De unge mennesker af hankøn, der sad på den anden side midtergangen blev budt først.

– Hvad koster det, lød spørgsmålet fra ungersvendene.

– Det er gratis, svarede den smilende stewardesse.

Og så kan det nok være, at ungersvendene bestilte både øl, snaps, cognac til kaffen og et par sjusser til senere brug.

Det med at få gratis mad og drikke er faktisk ikke almindeligt i nutidens fly. Og vi var ikke en gang med et charterfly til varme himmelstrøg, hvor rejsearrangøren skulle kapre nye kunder.

Nej, der var tale om det lille færøske flyselskab Atlantic Airways på vej til Færøerne, som ydede denne service. Det kunne de store flyselskaber lære ikke så lidt af. Jeg følte mig i hvert tilfælde hensat til de gode, gamle flydage, hvor gratis forplejning var en selvfølge.

# Meira um "Fame"

Í seinasta blað høvdu vit eina manningarmynd av "Fame". Í tekstinum vóru vit ikki heilt neyvir í frásøgnini um hvør ið átti "Fame". Men í Siglingarsøguni verður sagt, at í 1920 keypti Jákup Haraldsen saman við svágnum Joen Hendrik Olsen, Hendrik á Bug, sluppina "Fame" frá Óla á Miðgerði. Teir báðir vóru so saman um "Fame" inntil 1942, tá Hendrikur tók seg burtur úr.



*Jóan Hendrik Olsen.*

"Fame" var deyðsiglari og fekk sín fyrsta motor í 1940, ein 40 hk Skandia motor, sum var vanlig motorstødd tá í tíðini.

Undir krígnum sigldi "Fame" til bretska marknaðin við ísfiski, og hann varð seldur til Sigurd Simonsen í 1945.

Hendrikur førdi "Fame" at siga alla tíðina uttan hendinga túrar, inntil "Kyrjasteinur" kom í 1937, og hann førdi "Kyrjastein" fram til 1940. Teir vóru m.a. á sildaveiðu undir Íslandi og várarnar vóru teir við toskagørnum undir Íslandi. Jóan Hendrik var í ræðuliga illveðrinum í 1938, tá "Fossanes" gekk burtur. Greitt er frá hesum illveðrinum í samrøðuni vit høvdu við Malmberg Simonsen í fjørvár. Tá stóð Jóan Hendrik til róðurs í 3 samdøgur, og hetta merkti hann eisini aftaná. "Kyrjasteinur" var nýbygningur og var eitt framúr framkomið skip í teirri tíðini. Finnur, sonur Hendrik, var við undir Íslandi í 1940. Og hann minnist, hvussu íslendingar tustu umborð at síggja hetta "vidundrið" av einum skipi. Frá 1946 til 1946 var Hendrik bestimaður við Kyrjasteini, og í 1946 var hann við trolaranum "Krosssteini", sum Jákup Haraldsen átti. Í 1947 var hann aftur við "Kyrjasteini", og hann var helst ikki til skips eftir hetta.

Jóan Hendrik var føddur 11. juli 1890 við Gøtugjógv, sonur Óla Olsen – kallaður Stóri Óli og fyrru komu hansara Annu Petrinu, ættað úr Ólavstovu í Syðrugøtu. Jóan Hendrik var bert 3 ára gamal, tá mamman doyði.

Jóan Hendrik fór til skips við "Lauru" í 1907. Skipari var Petur Christian Petersen í Ólastovu í Syðrugøtu, sum var mammubeiggi Jóan Hendrik. Hann tók skiparaprógv í 1914 og í 1916-18 førdi hann "Energy" og í 1919 Báradrang hjá Mortensen á Tvøroyri og í 1920 setur hann føtur undir egið borð við "Fame".

Hendrik andaðist 28. mai 1952.

Soleiðis var at vera heima:

# Tá Fríðrik var deyður

**Meðan menninir sigldu vóru konurnar heima. Hvussu hetta kundi vera greiddi Brynhild Absalonsen av Viðareiði frá í eini samrøðu, vit høvdu við hana í fjør. Vit endurgeva eitt brot úr samrøðuni við hana, og lýsir hetta, hvussu ein kona kundi upplivað bardagaárini.**



*Brynhild Absalonsen.*

### Steffan var fiskimaður

Brynhild var gift við Steffan Absalonsen. Undir krígnum var hann við "Svínoynni". Teir fiskaði og sigldu niður við fiskinum. Skipari var Johan Purkhús, sum var versonur reiðaran, Jens Klæmint Isaksen. Steffan upplivdi ikki nakra serliga vandastøðu í hesi sigling.

Men hjá teimum, sum vóru heima, var ein støðugur ótti fyri, hvat ið kundi henda. Tað vóru javnan týsk flogfør sum flugu yvir bygdini, og stutt var millum boðini um, at skip vóru farin, ofta saman við manningini ella parti av henni. Álvarsemið merktist eisini hjá teimum, sum sigldu. Eina ferð Steffan sat og las "Víkingasynir", sum var um lagnuna hjá føroyskum sjófólki undir krígnum og við myndum av teimum, sum lótu lív, helt hann fyri, at her kundi hansara navn eins væl staðið! Hann hevði jú verið saman við fleiri av teimum, sum fórust.

### Kríggið endaði nakrar tímar ov tíðliga!

Teir forvunnu nógv við hesi sigling. Summir túrir vóru serliga góðir. Eg minnist, at tá kríggið helt uppat, tá var "Svínoyggin" akkurát farin niður at selja. Tað var gott marked, teir komu til, og teir roknaðu við einum góðum túri, tí teir høvdu fiskað skjótt. Teir vóru byrjaðir at selja, men júst tá kom fráboðan um, at týskarar høvdu yvirgivið seg. Tá gjørdist ein slík frøi á fólki, at alt steðgaði upp, og prísurin gjørdist meira at kalla vánaligur. Hevði bardagin vart bert nakrar tímar afturat, hevði túrurin verið nógv betri.

Eitt summarið var Steffan uppi á Norðlandinum í Íslandi til sildafiskarí við "Svínoynni". Hetta var í 1944, og hann var burtur alt summarið. Hetta var eitt gott ár. Hann var eisini tveir túrar við "gamla" "Skálabergi". Gamli Mortan førdi hann tann fyrra túrin og Kaj tann seinna.

### Sá tá jólaskipið fór

Brynhild minnist sera væl til, tá jólaskipið fór sunnudagin 7. desember 1941. Hetta man vera ringasta



*Fríðrik var hildin at vera deyður, men…*

veður, hon hevur upplivað. Tað var so sera gott veður leygardagin. Sjógvurin var so penur og slættur. Tað var snakkað um tað, at tvey skip vóru komin inn á Eiðsvík. Teir vóru komnir har, og veðurlíkindini vóru ring. Tað brast á og gjørdist eitt øgiligt illveður tað leygarkvøldið. Knappliga skifti hann ætt. Tá tað var so nógvur vindur og regn, hann lá fyrst í tað vestara vindeygað. Tá ljóst var morgunin eftir, sóu vit, hvussu skipið lá og bóltaði har í Fugloyarfirði. Tað var syndarligt at síggja. Avstandurin er sjálvsagt nakað stórur, men tað var ógvusligt at síggja. So sigi eg einaferð, at nú misti eg tað úr eygsjón. Tá minnist eg, at Steffan segði, at nú helt hann, at tað sakk. Tíðindini um vanlukkuna frættist rættuliga skjótt. Nógv fólk høvdu sæð, og telefon var jú tá.

### Minan brast

Annars merktist ikki nógv til kríggið á Viðareiði, men týskir flúgvarar flugu ofta uppi yvir. Ein flúgvari rendi einaferð á inni í Viðvík, og vrakið av honum hevur ligið har. Ein mina brast einaferð eysturi í Eiðsvík. Hetta var eftir at kríggið var av. Tað var ein ræðuligur brestur. Tað komu nógv "flóttarfólk" til Viðareiðis úr Klaksvík, sum var eitt meira upplagt bumbumál hjá týskarum.

Fyri mær var øll krígstíðin sera óhugnalig, tað kann eg siga. Tað vóru nøkur hús, sum høvdu radio og inni har flokkaðust fólk fyri at hoyra tíðindini. Prestur plagdi at vera tíðindaberari. Tað var Carlson, hann var dani.

### "Sea King"

Einaferð hildu tey Fríðrik, beiggja Steffan, vera burturgingan. Tað var undir krígnum, sum jú var ein syndarlig tíð. Fólkið heima bíðaði og bíðaði eftir einum skipi, til øll at enda mistu mótið. "Sea King" var ikki komin aftur í aftur aftaná 4 vikur á einum túri, sum vanliga tók eina viku. So her var øll møgulig orsøk til at óttast tað ringasta.

"Sea King" var farin niður at selja. Teir høvdu tikið fisk her í Føroyum. Hetta var fyrst í 1942 beint eftir nýggjár. Teir vóru ongantíð komnir fram til Onglands, har fiskurin skuldi seljast. Tað bleiv so leingi, man frætti einki, og kríggj var, og tað var einki hop um nakað. Rikka, konan, var á Viðareiði. Fríðrik hevði annars hús í Klaksvík, men flutti til Viðareiðis, tá kríggið kom. Her var tryggari. Tey áttu trý børn og tey vóru at vera hjá foreldrunum hjá Rikku, Juliusi og Sannu Margretu.

Rikka hevði púra mist mótið um, at teir fóru at koma aftur. Eg minnist, at Steffan segði hendan morgunin, at "eg havi nú væntað, at teir fóru at koma aftur. Men nú haldi eg, at tað er býtt at blíva við at rokna við, at tað hendir". Hann hevði droymt okkurt, sum fekk hann at halda, at teir vóru til.

Tað vísti seg, at skipið hevði fingið ein stóran sjógv, og sjógvur var komin í maskinrúmið, so motorurin var steðgaður, og skipið hevði rikið fyri vág og vind í ringum illveðri. Teir lógu har og róku og vistu ikki, hvar teir vóru. Har vóru bæði minur og flogfør. Eingin hevði gjørt teimum nakað. Teir komu einaferð so nær, at teir sóu land. Og tá vóru teir norðanfyri Føroyar, og teir kendu Mýling. Teir høvdu so mikið av motorkraft, at teir fingu siglt inn á Vestmanna.

Steffan og eg fóru eini ørindi tað kvøldið. Tá møttu vit konuni, sum hevði telefonstøðina. Hon steðgar á og sigur, at nú fari eg eystur til Rikku at siga henni, at "Sea King" er komin á Vestmanna. Hetta vóru góð boð. Men vit stóðu sum negld. Hetta var sum at fáa boð um, at onkur var risin upp frá deyðum. Mamma hansara plagdi seinni at taka til: "Tað var hinaferð Fríðrik var deyður". Soleiðis føldi hon tað. Jóannes hjá Gynnu hevði givið tey boðini norð, at teir vóru komnir á Vestmanna, og tað stóð væl til hjá teimum øllum. Vit fóru so oman til mammu hansara at siga henni frá. Hon vildi ikki trúgva tí, hon var meira at kalla illfør, tá hon segði: "Tit mugu ikki koma at fortelja tíðindi sum ikki passa". Eg minnist, at hon tveitti seg á síni knø at biðja um, at hesi tíðindi vóru røtt. Hon hevði fyrr fingið líknandi tíðindi sum ikki passaðu. Absalon tann yngsti beiggin var inni. Hann var altíð so stillur í tí. Hann segði seinni, at hetta ljóðaði eisini ógvuliga ótrúligt fyri sær.

Vit fóru ørindi heim á Brekkumørk og fóru so inn aftur, tá vit komu eysturaftur. Tá sat Rikka har. Hon hevði fingið telegramm frá Fríðriki og var komin heim til vermammuna at siga frá. Tá sigur Absalon: Ikki trúði eg tí, fyrr enn eg sá telegrammið: "Komnir á Vestmanna. Hava tað allir gott".

So tað kundi sanniliga vera dramatikkur eisini hjá teimum, sum vóru heima.

Øll frásøgnin hjá Brynhild finst á okkara heimasíðu, bløð nr. 314 og 315.



# Hin ónevndi sjómaðurin

*Jákup Joensen skrivaði bókina "Víkingasynir".*




**Aftana bardagan gav táverandi próstur og seinni varabispur Jákup Joensen út bókina "Víkingasynir", sum er um lív og lagnu hjá okkara sjófólki bardagaárini. Vit endurgeva eitt kapitul úr bókini sum snýr seg um dapra árið 1941.**

Teir síðstu dagarnir í mars, tá ið eitt skip fyri og annað eftir kom inn og segði frá, at tað hevði fingið skaða av flúgvaraálopi, steðgaðu nógv skip á Tórshavn, og spurningurin var nú, hvat ið var at gera. Skuldi siglast ella ikki?

Hin 27. mars vendir landsnevndin sær til bretar í Føroyum við bøn um at tryggja siglingina hjá føroysku skipunum.

Fiskivinnufeløgini hugsaðu sum landsnevndin, at umráðandi var at tryggja siglingina so væl sum gjørligt, og fyri sum skjótast at fáa eitt úrslit hesum viðvíkjandi sendir Føroya Skipara- og Navigatørfelag landsnevndini eitt bræv hin 30. mars. Í hesum brævi verður víst á, hvussu skipini teir síðstu dagarnar hava verið álopin frá týskum flogførum, og siga teir, at tað – sum satt var – vildi verið ræðuligur skaði, um vit nú skuldu mist í stutta tíð meginpartin av skipum okkara og nógv gott mannskap. Teir vísa á, at forboð er sett íslendskum skipum fyri at sigla, til nærri greiði fæst á viðurskiftunum. Teir heita tí á landsnevndina um at fáa eina líknandi skipan her hjá okkum.

Tað bar jú ikki so væl til í krígstíð at seta hervaldinum fyri, hvat ið gerast skuldi; men sjómenn okkara hugsaðu sær, at tað kanska var gjørligt, at bretskir jagarar javnan flugu yvir siglingsleiðina, at smærri krígsskip og kavbátajagarar sigldu nógv hesa leið, ella at tey føroysku skipini sigldu í konvoy og høvdu góða verju við sær.

Hin 31. mars verður fundur hildin í Havn. Har var til staðar landsnevndin, amtmaðurin, fiskivinnufeløgini og reiðarafelagið. Úrslitið av hesum fundi var, at fiskimenn fingu trygging fyri, at teir fyri hvørja ferð til Bretlands í minsta lagi skuldu fáa 500 kr. í løn.

Men nøkur avgerð, sum forðaði skipunum í at sigla, varð ikki tikin.

Bretar lovaðu, at hvat ið gerast kundi, skuldi verða gjørt fyri at tryggja siglingina hjá teimum føroysku skipunum, men stórt meira kundu teir rímiligt ikki siga í krígstíð.

### Avgerðin løgd í hendurnar á teimum sum sigldu

Landastýri okkara vildi ikki taka ábyrgdina fyri at steðga siglingini. Avgerðin var løgd í sjómansins hond. Hann var tann, sum skuldi fara, um farast skuldi, og tá ið nú eisini avgerðin um sigling ella ikki sigling var løgd á hansara herðar, var Føroya fólks lagna í bardagatíðini løgd í sjómansins hendur.

Í hesum døgum gingu Føroya skiparar og fiskimenn álvarsamir, hugsaðu aftur og fram: Skal eg fara? Ella skal eg ikki fara? Í einsemi og tøgn varð avgerðin gjørd.

Hvat ætlar tú? varð ofta spurt í teimum døgum

Tá ið mest stóð á, søgdu í framtíðini ónevndir og ókendir føroyskir sjómenn: Vit fara!

Føroya sjómenn tóku avgerðina, teir tóku eisini stoytin, teirra er tann heiður, sum Føroyar komu út úr krígstíðini við.

Eitt skipið fyri og annað eftir fór. Verjuleysir at kalla sigldu Føroyingar júst har, sum heimsins størsta sjókríggj helt á næstan 6 ár.

Hjá monnum, sum skuldu sigla millum Føroyar, Bretland og Ísland í krígstíðini, var umráðandi at hava grunn og skjótfør skip við lítlum rigningi og ongum seglum, skip, ið vóru væl vápnaði.

Eitt grunt skip kundi – um tað kom inn í minusettan sjógv – sigla óskatt tvørtur yvir minunum.

Eitt skip við góðari ferð var ført fyri at sigla land úr landi í myrkri, tá náttin var long, og bar ein kavbátur eyga við tað, mátti hann vera nakað beint fyri tí, um hann lætt skuldi koma tí í skotmáli.

Jú meiri ferðin var, tess størri grøvan varð frá skipinum, og tess lættari tveitti brotið eina leysa minu so langt frá bógnum, at hon ikki bar við.

Tá loftálop kom – og tað var mangan – var tí ólíka lættari at skáka sær undan flúgvara og bumbum við einum skjótførum, grunnum skipi enn við einum djúpum skipi, sum hevði lítla ferð.

Hjá teimum, sum sigldu um høv í krígstíðin í friðarørindum, var umráðandi at fara so ósæddur sum gjørligt, og nógv er í millum, at eitt skip við høgum rigningi sæst longur, enn eitt við lágum; eru tá eisini segl sett, sæst skipið so avbera langt, og tað væl.

Spyrt tú nú, hvussu nógvar av hesum dygdum tey føroysku skipini høvdu, verður svarað: Onga!

Tey føroysku skipini eru djúp, hava høgan rigning og lítla maskinu og mega tí nýta segl.

Skip okkara vóru ætlað til snørisfiskiskap, og til hetta brúkið er eitt djúpt skip eitt gott skip, eitt grunt skip ringt skip.

Í stilli, á sløttum vatni sigldu tey flestu føroysku skipini einar 5-7 sjómíl við motori. Í mótvindi og illveðri var hann hentur at styðja skipið, men tá nakað av vindi var ímóti, fór lítið og einki fram; tí var ofta neyðugt at seta segl. Umráðandi var jú at koma á marknaðin við fiskinum, áðrenn hann var spiltur. Men at seta segl var mangan tað sama sum at hava upp á mastur fyri týskinum.

### Tá ynskt var eftir illveðri

Um tað so var jólanátt, var hon næstan øllum nógv ov stutt at sigla land úr landi í myrkri. Sá ein kavbátur eitt føroyskt skip og ætlaði tí ilt, kundi hann við vissu siga: Hond er, ið hevur; tí aftur fekk hann tað altíð.

Í friðartíð heldur sjómaðurin myrkrið vera ódámligt, mjørkin er tvørligur, ódnarveður kann vera vandamikið, og kavarok ræðist hann, tá skip ella land er í nánd. Men tá ið Føroyingar í krígstíðini hildu í havið, ynsktu teir langa nátt, nógvan og tjúkkan mjørka, kavarok og illveður, tí tá fekst ikki so lætt eyga á teir.

Umhugsan og avnoktan kostaði tað tí einstaka sjómanninum at siga: "Eg fari!" Viðhvørt merkti henda avgerð at fara og ikki koma aftur; tí álopini vóru jøvn eina tíð. Føroyum kostaði henda sigling nógv góð skip, og av hesi sigling mistu vit so nógv fólk, at londini, sum vóru beinleiðis uppi í bardaganum, mistu ikki meira.

Føroyar mistu 20 skip í árinum 1941.

Annars hava vit fingið upplýst, at tilsamans vóru 4.000 mans, sum sigldu undir krígnum í styttri og longri skeið. Teir mannaðu 187 skip og gjørdu 30.000 túrir. Tað eru ikki meira enn 10-15 ár síðani, at tað eydnaðist teimum at fáa rætt til krígspensjón. Tann sum var fremsta ímyndin av hesum avriki var Knút Nolsøe á Tvøroyri.

MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

*Bjargingarútgerð*
*á sjógvi og landi*

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð.*
*Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*



· Bjargingarbátar
· Bjargingarnet
· Yvirlivilsisdraktir
· Flótidraktir
· Bjargingarvestar
· Bjargingarkransar
· Epirbar/neyðsendarar
· Radartranspondarar
· Eldsløkkjarar
· Eldávaringar
· Branddraktir
· Umvælingar
· Eftirlit

P/F Gummibátatænastan
Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

Vitja eisini heimasíðuna hjá Føroya Fiskimannafelag: www.fiskimannafelag.fo

## Samrøða við Sofus Poulsen – 2. partur

**At taka úr blaðnum**

Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum

# Býdrongur hjá Hans Joensen

Sofus fer úr Gøtu til Havnar at ganga í skúla. Síðan fer hann til Klaksvíkar at búgva. Og so endar hann í Aberdeen.



*Sofus.*

### Álop – meðan vit eru í torvi

Eg minnist fleiri luftálop. Tey vóru oftast í Havn og á Skálafjørðinum, tí har lógu altíð krígsskip.

Eg minnist, at ein tangabátur lá fyri akkeri yviri av skipasmiðjuni á Skála, tá eg og abbi einaferð fóru norður í Boð at bera torv úr tí ovari krónni og oman í krónna á bakkanum. Stríðið var nógv at fáa torvið til hús. Seinni, tá ið viðraði, fekk abbi ein bát til láns av Skipanesi og farið varð norður í Boð, har torvið so bleiv fylt í sekkir, sum síðani vóru laðaðir í bátin. Fyrst á miðjuni, so framman og aftan á bátinum. Millum stakkarnar av sekkum var pláss at rógva. Øll máttu sita pinna still, so at báturin ikki skuldi rulla og taka sjógv inn, fríðborðið var bert nakrar fáar tummar. Tá ið vit vóru komnir á Skipanes, kom ein lastbilur eftir torvinum og koyrdi tað yvir til Gøtu.

Tað var ein heystardag, at vit bóru torvið oman. So hoyri eg nøkur "bunk", sum tá ið bumbur verða kastaðar. Eg sigi við abba, at nú eru teir aftur eftir "Caroline Thorden". Hetta var ein finskur dampari, sum var á veg til USA við "newsprint" pappíri og nøkrum ferðafólkum. Hon var sett upp á land norðuri í Sundalagnum. Teir høvdu fingið frítt at fara – frá bæði týskarum og teimum sameindu – men hóast hetta bleiv hon bumbað av týskum flogfari, tá ið hon lá í Nólsoyarfirði. Eldur kom í lastina og skipið brendi í fleiri dagar. Nøkur av teimum umborðverandi doyðu og onnur fingu skaða. Eg búði í Havn tá og var á keiuni, tá ið "Streymur" kom við fólkinum. Reyða Kross ambulansurnar hjá hermonnunum fingu ikki koyrt fyri fólki, sum var komið oman á keiuna. Teir noyddust tí at rópa "luftalarm", fyri at fáa fólkið at renna burtur av keiuni, so ambulansurnar kundu sleppa at koyra skaddu fólkini á hospitalið.

Vit eru nú aftur norðuri í Boð, og eg hoyri eitt kraftugt surr aftanfyri meg. Omma hevði sæð flúgvaran koma lágt yvir sjógvin inn eftir víkini, og so upp um fjallið, og tá fara skjútsini á Skálalandinum at skjóta eftir flogfarinum, og granatirnar brustu rundan um meg. Eg rann yvir undir steinarnar at kroka. Tað var har, vit annars plagdu at fáa okkum ein drekkamunn. Tá ið flúgvarin so kemur hinumegin fjørðin, verður skotið frá Skipanesi og Søldarfirði, og hann fer so yvir ímóti tangabátinum, sum lá fyri akkeri á fjørðinum. Skjúttin umborð á tangaskipinum skjýtur fyrst tvær ferðir eftir flogfarinum, og so skjýtur flúgvarin tvær ferðir móti tangabátinum. So varð ikki meira skotið teirra millum. Flogfarið kastaði bumburnar niður, og tað var eitt slíkt rok, at eg helt, at tangabáturin var sokkin. Men tá avtornaði fleyt hann framvegis. Morgunin eftir fáa vit at vita, at skjúttin umborð varð dripin.



*Sofus sum slóttumaður. Her saman við ommu síni Magninu og børnunum Charles, Marjun og Danny.*



*Hetta er steinurin norðuri í Boð, har Sofus krokaði, tá luftkanónirnar á Skálalandinum skutu eftir týska bumbuflogfarinum, sum kom inn eftir Gøtuvík, og so niður á Boð, har Sofus og abbi hansara bóru torv oman á bakkakrógvina um heystið 1941.*

### Tjúgu ár fram

Nú fari eg at leypa tjúgu ár fram í tíðina. Eg var tá á Umboðsstovuni í Aberdeen. Tá kemur ein maður og bankar uppá. Tann dagin var seyðamarknaðardagur, og hann hevði ein fjallstav í hondini. Hann segði seg vera seyðabónda nærhendis Scrabster. So segði hann, at beiggi hansara doyði í Føroyum undir krígnum. Sjálvur livdi hann ikki heilt væl. Hann átti eina systur, sum var á lívi, og tey bæði vildu fegin vita, hvat ið var hent við beiggjanum. Tey høvdu bert fingið eitt stutt fjarrit við boðum um, at beiggin var "killed in action". Tað var ikki loyvt at siga meira, tí fíggindin mátti ikki fáa at vita meira enn neyðugt. Hann fortaldi, at beiggin var í flotanum og tá eg spurdi nærri, greiddi hann frá, at beiggin var ein "gunner", kanónskjútti. Eg spurdi, um hann sigldi við einum tangabáti. Svarið var: "Jú, júst tað." Tá kundi eg greiða bóndanum frá, at eg hevði sjálvur sæð tilburðin, og eg kundi váttað, at beiggin veruliga var deyður í einum samanbresti.

Tá ið eg komið oman aftur í fjøruna, stendur abbin har og skimast upp í luftina. Eg bað hann fyri alt í verðini um at leggja seg niður. Annars var tað eitt annað flogfar, sum datt niður í Gøtu, men hetta er ein søga, sum er alment kend.

### Ein annar torvdagur

Vit, Sanna fastur, John og eg fóru frá húsum uml. kl 7 á morgni og gingu um fjall yvir í Boð. Vit skuldu bera burtur og vóru har yviri allan dagin. Veðrið var gott, og onnur gøtufólk vóru eisini har á leið. Ein teirra var Hans David á Skansa, sum fyri stuttum er farin. Sum ikki einaferð



*Hendan myndin í seinasta blað skal hava hesa rætting: Kisturnar eru tiknar umborð á Pride. Og kvinnurnar á myndina er t.h. Suffía Gregersen, dóttir Poul Chrisoffer Poulsen og t.v. Sanna, dóttir Dánjal Poulsen.*

Framhald á næstu síðu



*Millum teir løgmenn, sum Sofus hevur verið saman við í Bretlandi, er Pauli Ellefsen. Her hittast teir á 50 ára starvsdegnum hjá Sofus 28.6.1998. Í miðjuni er Nessie kona Sofus.*



*Sofus við sínum systkjum í 1940. Sofus situr niðri, John stendur, og tann minsti drongurin er hálvbeiggin Gudmundur. T.h. er Óluva og t.v, hálvsysturin Marjun. Tann yngsta systirin Ruth var født í 1943.*

í Føroyum køvdi hann av við mjørka, nakað áðrenn vit vóru liðug. Sýnið var bara nakrar fáar favnar, men tá ið vit vóru liðug, fóru vit til gongu upp á fjall og hittu Hans David, sum helt, at vit áttu at bíða eftir honum, til hann var klárur at fara heim. Tað var hættisligt at fara einsamøll í hesum mjørkanum, men vit hildu, at vit fóru nokk at klára tað og hildu leiðina fram.

Stilli var og vit kundu, sum oftani í mjørka, hoyra dreingir uppi í haganum í Søldarfirði rópa sínámillum um, at teir høvdu funnið eitt krákureiður. Hans David hevði hoyrt okkum trý tosa saman og hevði rópt eftir okkum, men vit høvdu ikki hoyrt hann. So merkiligt kann tað vera í mjørka, at ein kann hoyra ljóð langt burturi men ikki tey, sum eru nærhendis.

Tá ið vit høvdu gingið í umleið hálvanannan tíma, hoyrdu vit likkur. Eg helt fyri, at likkur skuldu ikki verið við liðið. Tað er portrið, har neytini vóru latin inn og út í hagan morgun og aftan. Nú klárnar eitt sindur í, og vit síggja sjógv. Her var okkurt galið, tí sjógvur var eingin uppi í Gøtuhaga, og so síggja vit ein stóran reyðmálaðan steyra við einum rundum træmerki í erva. Hesi vóru navigatiónsmerkir, sum bretska krígsmarinan brúkti, tá ið tey komu inn á Skálafjørðin, sum bretar kallaðu "Little Scapa Flow" eftir kendu flotahavnini í Orknoyggjum. – Teir hildu nevniliga, at fjørðurin var góð flotahavn. – Hesir steyrar vóru settir upp ymsastaðni runt um á fjørðinum, og eg visti, at eitt bretskt "survey" ship við stórum krána framman hevði mált fjørðin upp og sett hesar upp. Sama skip hevði eisini lagt kavbátanet tvørtur um innsiglingina til Skálafjørðin, so at týskir kavbátar ikki skuldu kunna sníkja seg inn at søkkja krígsskip, eins og teir høvdu gjørt á Scapa Flow í Orknoyggjunum. Her høvdu teir søkt stóra slagskipið "Royal Oak", og 800 av manningini druknaðu.



*Fosturpápi Sofus, John Johannesen.*



*Hetta er brúðarmynd av bretska konslinum Frederic Mason. tá hann giftist við donsku Karen. Amtmaðurin Hilbert t.h. var forlovari. Hinir báðir á myndini Husted-Andersen, sakførari og Aksel Jørgensen, stjóri á Balslev.*

Men hjá trimum troyttum torvfólkum var hesin navigatiónssteyri ikki til nakra gleði, tí nú vistu vit, at vit høvdu gingið í ein stóran runding í meira enn ein tíma og vóru bert komin uml. 300 metur oman frá, har vit høvdu stríðst allan dagin í torvi. Nú noyddust vit so at fara eftir gøtuni suður á Gøtueið, og so eftir vegnum oman til Syðrugøtu, hagar vit komu troytt og móð umleið kl 22, og omman var sjálvandi glað at síggja okkum, tí hon var blivin bangin um okkum. Bert spell at vit ikki høvdu givið okkum tíð at bíða eftir Hans David.

## Aftur fram í tíðina

Nú fara vit aftur nógv ár fram í tíðina. Eg eri í Skotlandi og á Umboðsstovuni. Vit bæði, konan og eg, vóru farin ein biltúr ein sunnudag seinrapart á sumri uml. 1990 og koyrdu til Collieston. Hetta er ein lítil gomul bygd, við eini lítlari vík, nakað á støðd sum helvtin av Syðrugøtu. Har vóru umleið 20 útróðrarbátar, áðrenn trolararnir komu til Aberdeen fyri 150 árum síðani. Sólin skein bæði oman og niðan, og vit parkeraðu bilin niðri á keiuni. Nakað seinni sá eg tveir slóttumenn sláa grasið uttanfyri garðin á einum stórum húsi, nakað miðskeiðis í bygdini í tí lægra partinum av bygdini. – Hús standa eisini omanfyri við útsýni niður yvir víkina. – Sum oftani fyrr tá ið eg hitti slóttumenn, sum familjan hjá mær eisini væl minnist til, fór eg yvir til teirra og spurdi, um teir vildu hava hjálp. Teir blivu vist bilsnir, tí slíkt vóru teir helst ikki vanir við. Annar handaði mær líggjan – klossut skotskt orv. Eg byrjaði so at sláa, men illa gekst. Eg spurdi, um teir høvdu eitt carborundum brýni. Jú, tað høvdu teir, eg bryndi so líggjan. Tað dugdi eg, tí abbi hevði gjørt mær eitt orv, tá ið eg var 7 ára gamal, og hann lærdi meg eisini at brýna. Tá ið eg hevði sligið nakrar líggjaskógvar, og eg føldi at drobblørður vóru við at koma, gavst eg at sláa, men hvesti báðar líggjarnar hjá sláttumonnunum, sum vóru fegnir um at fáa hvassar líggjar at sláa við.

Nú kemur ein eldri maður við leðurkasketti oman til okkara. Hann spyr, hvussu tað bar til, at eg dugdi at hjálpa slóttumonnum hansara at sláa. Eg segði sum var, at eg fekk líggja frá abba mínum, tá ið eg var 7 ára gamal, og at hetta var í Føroyum. So segði eg, at eg var umboðsmaður Føroya í Bretlandi. Hann sigur so, at hann hevði verið í Føroyum beint eftir, at oyggjarnar vórðu hersettar av bretum. Eg spurdi so, um hann var hermaður, in "the army". Nei, hann var "Captain of a Survey Ship". Hann nevndi navnið "Franklin" og segði, at hann hevði mált upp Skálafjørðin og lagt kavbátanetini. Eg spurdi so, um hann hevði verið aftur í Føroyum síðani. Nei, tað hevði hann ikki. Eg spurdi so um navn og bústað hansara, so eg kundi senda honum upplýsandi tilfar og sjónband um Føroyar í dag. Hann skrivaði so hetta í mína lummabók. Maðurin var Real Admiral Sir Ritchie, retired (eftirløntar). Mundi vera um 80 ára aldur tá. Eg segði honum, at eg mintist til skip hansara, sum hevði stóran krána framman, men navnið mintist eg ikki. Eg sendi honum tilfarið um Føroyar, og hann sendi mær ymiskar botntekningar av Skálafjørðinum o.a. Ja, sum man sigur, "it is a small world".

Seinni fekk eg eina bók frá soni mínum, sum hann hevði funnið, har Admiral Ritchie hevði skriva um sína lívssøgu í bretsku marinuni. Har var bæði sagt frá um Føroyar og um arbeiði hansara í vestur Afrika. Sanna fastur vitjaði eisini Collieston, tá ið hon var á vitjan í Skotlandi í 1999.

## Í skúla í Havn

Fyrst undir krígnum búði eg í Havn, tí fosturpápi mín fekk arbeiði hjá Helgason og Melsted – ið var ein íslendsk heilsøla. Eg gekk fyrst í kommunuskúlanum og seinni í Realskúlanum. Vit vóru í Havn, tá "Lincoln City" varð søktur. John varð staddur niðri hjá Rubbek, tá ið týska flogfarið kastaði torpedoirnar. Hann kavaði undir ein bil hjá Valdemar Lützen, meðan alt rokið var. Valdemar Lützen var bretskur konsul tá.

Lærararnir, sum vit høvdu í kommunuskúlanum, vóru Zacharias Sørensen,



*Her síggjast hermenn marsjera í Havn.*

*Framhald á síðu 15*

# Á landsfundi hjá Norges Fiskarlag

**Í Noregi rennir ein seg alla tíðina á Føroyar. Hetta var eisini galdandi, tá ið Føroya Fiskimannafelag luttók á landsfundi hjá Norges Fiskarlag.**

Norges Fiskarlag helt landsfund í Trondhjem í døgunum 7.-9. oktober. Samband hevur verið millum norska felagið og Føroya Fiskimannafelag síðan 1961, tá Norges Fiskarlag luttók í 50 ára haldinum hjá FF. Síðani tá hevur FF verið boðið at luttaka á landsfundum hjá Norges Fiskerlag, og tað vóru vit eisini hesa ferð. Umboð felagsins var formaðurin. Aðrir fremmandi gestir vóru umboð fyri fiskimenn í Danmark, Svøríki og Írlandi.

Norges Fiskerlag er bygt upp á ein øðrvísi hátt enn tað vit kenna til. Sigast kann, at Norges Fiskerlag er eitt meginfelag fyri veiðuliðið í Noregi. Felagið er stovnað í 1926, og grundarlagið er fyrst og fremst lokal útróðrarfeløg kring landið, sum so aftur eru savnað í fylkeslag, ella økisfeløg. Hesi eru feløg, sum eisini umboða teir, sum eiga bátarnar eins og okkara útróðrarfeløg gera. Men umframt hetta er norska reiðarafelagið fyri havfiskiflotan, Fiskebåtrederens Forbund, eisini við í Norges Fiskerlag.



*Jan Skærvøy og Reidar Nilsen, aðalskrivari og formaður í Norges Fiskarlag.*



*Knut Arne Høyvik er kunningarleiðari hjá Norges Fiskarlag. Hann kennir eisini til Føroyar sum fiskimaður á línubátum undir Føroyum, og ikki minst tá teir komu inn at kroka. Tað var ikki minst stuttligt at koma inn á Klaksvík, har tað lá væl fyri at fara í dans, og genturnar vístu seg at vera sera fittar.*



*Roynt verður at fáa ungdómin at hava áhuga fyri felagsarbeiði. Hetta er eisini tiltrongt eins og aðra staðni, tí tey flestu, sum møta til slíkar fundir, eru rættuliga tilkomin. Men útnevnd vóru nøkur serlig ungdómsumboð, sum tó ikki høvdu atkvøðurætt. Men hesar fýrarnir, sum vóru fyrst í 20-unum fara kanska at gera seg galdandi sum frá líður.*

## Mótstríðandi áhugamál

Men tað eru nú eina ferð mørk fyri, hvussu nógv áhugamál kunnu savnast undir einum hatti, tí í Noregi eru nógv mótstríðandi áhugamál innan fiskiveiðu. Av hesum kann fyrst og fremst nevnast stríðið millum tað, sum vit kalla útróður og tey størru skipini um býtið av botnfiskatilfeinginum. Tað eru sterkar kreftir, sum halda, at veiða av m.ø toski og hýsu í Noregi skal fyrst og fremst fara fram við smærri bátum fyri at halda lív í teimum smærru plássunum fram við strondina. Onnur halda, at veiðan skal eisini fara fram við stórum skipum, sum trolarum og stórum línubátum, sum frysta umborð. Tað eru hesi, sum t.d. reiðarafelagið umboðar. Henda toganin hevur merkt, at nógvir útróðrarmenn eru farnir úr Norges Fiskerlag og hava stovnað Norges Kystfiskarlag, hóast Norges Fiskerlag hevur roynt at javnviga millum bæði sjónarmiðini. Hinvegin eru nógvir fiskimenn á teimum stóru skipunum limir í Norsk Sjømannsforbund, sum hevur eina serliga fiskimannadeild, ið ger sáttmála við Fiskebåtredernes Forbund. Sjómannasambandið hava vit eisini eitt sera gott samstarv við og líkist hetta mest FF av umrøddu feløgum. Samstundis gera manningardeildin og báteigaradeildin í Norges Fiskerlag sáttmála sínámillum.

Annars kann sigast, at Noregs Fiskarlag er avgjørt høvuðsumboðið fyri norska fiskiveiðu. Tí var landsfundurin eisini ein stór samkoma við einum 250 luttakarum. Av hesum vóru færri enn 100 beinleiðis umboð, meðan restin vóru gestir, sum umboðaðu allar greinir innan norska fiskivinnu eins og pressan var væl umboðað.

Sigast má, at tað var hugaligt at koma á ein slíkan landsfund. Tað hevur verið so mikið av sambandi landanna millum, at ein kom at tosa við fleiri, sum høvdu havt samband við Føroyar so ella so, og hesi koma vit eisini at umtala.

## FF við í fundarsamtykt

Vit gjørdust ein lítil partur av sjálvum landsfundinum, tá ið umboðini fyri fiskimenn í øllum londunum, sum vóru til staðar, skrivaðu undir tvær yvirlýsingar.

Onnur var um ólógligu veiðuna í Barentshavinum, har tað – sum skilst – fyrst og fremst eru russarar, sum hava staðið fyri hesi ólógligu veiðuni. Hetta hevur m.a. við sær eina undirgraving av royndunum at varðveita fiskastovnarnar á einum burðardyggum støði, og síðani kemur hesin yvirskotsfiskur at trýsta fiskaprísirnar á marknaðinum. Tí verður heitt á avvarðandi lond um at taka stig til, at slíkur fiskur als ikki kemur inn á marknaðin.

Hin yvirlýsingin var viðvíkjandi "spøkilsisveiðu" við gørnum. Hetta eru serstakliga mist havtaskugørn hjá sponskum skipum, sum standa og fiska í langa tíð til stóran skaða fyri stovnin. Heitt verður á EU um at seta orku og pening av til at rudda upp í hesum, so tey mistu gørnini kunnu verða tikin upp aftur, og annars at skipa fyri neyvum reglum á hesum øki, so tað slepst undan mistum gørnum í størst møguligan mun.

Her kann skoytast uppí, at vit vita einki um slíkar trupulleikar við gørnum á okkara fiskileiðum.

## Norðmenn væl nøgdir

Sum vanligt ofta er á landsfundum var fyrsta rættiliga málið á skránni ársfrágreiðingin fyri landsfundarskeiðið, sum er tvey ár, nevniliga 2003 og 2004. Her varð greitt gjølla frá øllum teimum málum, sum arbeitt hevur verið við, og tey eru ikki so fá. Men annars er bjartskygni galdandi í norskari fiskivinnu. Landingarvirðið var í 2004 10.4 mia. Nkr., og er hetta væl meira enn seinasta ár, men kortini minni enn í 2002. Tølini higartil fyri 2005 bendu á eina øking í mun til 2004.

Høvuðsfiskasløgini eru sild og toskur, sum umboðað helvtina av veiðuvirðinum.

Annars er talið á fiskimonnum nógv minkað



## Veteranar við tilknýti til Føroyar

Við á landsfundinum vóru eisini bodnir veteranar, tvs. gamlir álitismenn í felagnum. Hesir eru frá vinstru: Charles Remø, Hallstein Rasmussen og Anton Leine og liggja allir um tey 80 árini. Og so vísir tað seg, at teir so ella so hava havt samband við Føroyar. Charles Remø var ein av teimum, sum kom til Føroyar undir krígnum. Hann steðgaði ikki leingi, og hann var eisini aðra staðni. Millum annað var hann við til sameindu innrásina í Nordmandínum í 1944, sum var við til at avgera krígg-ið. Vit fara seinni at hava eina gjølligari frásøgn frá honum.

Hallstein Rasmussen er sera væl kendur í Føroyum frá teimum tíðum, tá hann var norskur samráðingarleiðari, tá samráðst var um fiskiveiðurættindi. Hann er bergtikin av Føroyum, og vit fara í aðrari grein at greiða meira frá Hallstein, grundað á bók, sum er skrivað um hann. Í hesi bók sæst, at hóast hann hevur ferðast kring allan heimin, so eru tað Føroyar og føroyingar, sum standa honum nærmast. Ein heilt serstakur vinur hjá honum var Gunnar Gunnarsson. Hallstein sendir øllum sínum vinum í Føroyum hjartaliga heilsan.

Anton Leine er fyrrverandi næstformaður í Norges Fiskarlag, og hann er kendur undir Føroyum, har hann hevur fiskað nógv við línu. Og so vísti tað seg, at kona hansara Ragnhild er systir konu Per Ervik, sum eitur Kjellaug. Hetta gevur eisini í sær sjálvum eitt eyka samband við Føroyar. Anton kennir eisini væl Støylenættina. Tað var jú Esther sum giftist við Jens Sofus Isaksen og varð verandi í Føroyum.

Framhald á næstu síðu

## Fáa ikki egnarar



Kent Bensvik er nýggjur formaður í Værøy Fiskarlag við umleið 70 limum, og hann gongur uppí hetta arbeiðið við lív og sál. Tað eru fleiri fiskimenn enn hetta limatal sigur, men júst í Lofoten stendur Kystfiskerlaget sterkt, og eru fleiri fiskimenn limir har. Værøy er ein lítil oyggj, sum leggur beint uttanfyri Lofoten, har Røst eisini liggur, hagani tað er 1-2 tímar at sigla. Á oynni búgva eini 700 fólk, og sum í nógvum líknandi plássum er fólkatalið í minking. Men minkingin er tó slakað av í seinastuni, so fólkatalið er hampiliga støðugt nú.

Værøy liggur væl fyri ikki langt frá fiskileiðum, og er tí gott útróðrarpláss. Men Kent sigur, at teir hava trupulleikar við at fáa egnarar. Sjálvt kr. 200 fyri stampin er ikki nóg mikið at fáa fólk til at egna. Teir hava enntá umhugsa at innflyta fólk úr Baltalondum til egning. So hann helt, at tað kundi kanska verið eitt hugskot at fingið føroyingar hagar at egna. Hjá einum landi, sum eigur heimsmeistarin í egning, skuldi verið nóg mikið at taka av. Um onkur hevur hug at royna hetta, kann hann venda sær til okkara.

Annars hevur Værøy eisini ein stóran sildaídnað, har sild verður hagreidd á ymiskan hátt og gevur hetta nógv arbeiði. Kent hevur fingið konu av oynni. Hon er dóttir tann einasta hvalafangaran sum eftir er á oynni, so tvøst er nærum hvønndagsmatur hjá teimum. Tey eiga tríggjar dreingir, sum royna seg við egning, men tað er ikki nóg mikið.



*Henrik Svenberg er nýggjur formaður í Sverikes Fiskares Riksforbund. Hann hevur nú ikki nakra vanliga yrkisleið, har hann byrjaði sum fiskimaður og endaði sum formaður. Hann kemur nevniliga úr svensku fisivinnuumsitingini, og er heintaður hagani at gerast formaður. Hetta gevur í hvussu er ein fyrimun, tá talan er um samráðingar við myndugleikarnar. Sum aðra staðni er gingið afturá við fiskivinnu í Svøríki. Teir hava tó úti við 10 nótaskip eftir. Hendrik Old plagar at nýta feriur frá tinginum at fiska við onkrum av teimum.*

## Í fjør høvdu vit eina greinarøð um teir norðmenn, sum komu til Føroyar aftaná, at Týskland hevði tikið Noreg í 1940.



Ein stórur partur av hesi søgu er myndað av teimum fimm Ervik brøðrunum, sum saman við øðrum komu til Føroyar við skipi teirra "Juvel". Ikki minst bróðurin Rasmus var kendur sum ein undangongumaður í fiskiskapi undir Grønlandi og New Foundland. Hann hitti Óli Jacobsen annars fyrstu ferð hann luttók á landsfundi í Norges Fiskarlag í 1971. Henda Ervikættin er framvegis umboðað á landsfundum og hesa ferð við Jørgen Ervik. Hann hevur kortini minni við Føroyar at gera, tí hann er sonur Sverra, sum var tann beiggin, sum var eftir í Noregi. Men hann hevur við áhuga lisið søgurnar um pápabeiggjarnar í Føroyum. Og tað er framvegis tætt samband millum næsta ættarlið av Ervikkunum og teirra vinir í Føroyum.

Um virksemið hjá Ervikættini nú greiðir Jørgen soleiðis frá:

*Ved siste nyttår solgte vi "Juvel" og delte selskapet slik at de som var aktive og hadde interesse for det fortsatte i Ervik Marine Services AS, og de andre fikk utbetalt sin andel.*

*Det var hva vi på norsk gjerne kaller et generasjonskifte. Du vet vi var etterhvert blitt mange aksjonærer bosatt flere steder i landet og med liten interesse for hva vi drev med.*

*Selskapet eiger nå kun en liten andel (25%) av "Juvel" som forøvrig i dag heter "Granit".*

*Videre eiger vi en line/garn båt som driver fiske i Canadisk farvann med Canadisk flagg.*

*Ervik Marine Services AS har også i lengre tid arbeidet med et fiskeriprosjekt i Sørishavet, som vi håper å lykkes med samtidig som vi har arbeidet en del for selskaper med interesser i seismikk/oljeleting.*

seinastu árini, úr 30.000 í 1986 niður til helvtina av hesum í 2004. Tá eru parttíðarfiskimenn eisini íroknaðir.

### Ludvigsen fagnaður

Næsta stórmálið á skránni kallaðist "Fiskerinæringens Betydning for Utviklinga på Kysten." Eitt fundarskjal í 24 punktum varð gjørt um tey stig, sum eiga at verða tikin á hesum øki. Sum hjá okkum verður nógv tosað um gransking og menning.

Í hesum sambandi hevði fráfarandi fiskimálaráðharrin – Svein Ludvigsen – eina áhugaverda framløgu, har hann greiddi frá sínum avrikum sum ráðharri, soleiðis sum hann sá tey.

Hann vísti m.a. á, at hann hevði gjørt umsitingina munandi einfaldari. Mál, sum fyrr tóku mánaðir at avgreiða, taka nú eins nógvar vikur. Og í øðrum førum eru 22 reglugerðir lagdar saman í eina. Tað tyktist eisini at vera semja um, at Ludvigsen hevði verið ein tann mest virkni fiskimálaráðharri, sum nakran tíð hevur sitið. Hann hevur dugað at skera ígjøgnum. Semja var ikki um alt, sum hann hevði gjørt, men tað, sum ikki roynist eftir ætlan, kann rættast aftur.

Tað var annars stórur munur á hansara fortreytum sum ráðharri í mun til flestu aðrar. Tað hevur nevniliga leingi verið greitt, at hetta fór at vera hansara seinasta skeið í politikki. Hann er nevniliga útnevndur til at vera fylkesmand í Troms. Hetta starvið hevur við sær, at hann umboðar almenna Noreg í sínum øki og verður tískil embætismaður. Tískil nýttist Ludvigsen ikki at vera ræddur fyri at gera nakað, sum kundi hótta hansara møguleikar at verða afturvaldur. Tað kann viðhvørt vera ein fyrimunur.

### Umstríddar bygnaðarbroytingar

Bygnaðarbroytingarnar í flotanum upp til 15 metrar vóru annars tað stóra evnið á landsfundinum, og hesin partur av flotanum telur um 3.000 fiskifør.

Her hevur undanfarna stjórnin politiskt ynskt at fáa eina tillaging, so tað blivu færri bátar og meira í part til hvønn bátin. Hetta skuldi so aftur havt við sær størri lønsemi.

Higartil hevur ein upphøggingarskipan verið galdandi fyri hendan partin av flotanum. Hon hevur virkað á tann hátt, at tá bátar eru upphøgdir og eru farnir úr flotanum, so er kvotan farin í felagspuljuna, og hevur tí ikki munað so nógv hjá hvørjum einstøkum fari, sum eftir hava verið.

Men nú ein nýggj skipan í uppskoti, sum leggur upp til, at hvørt far kann keypa so mikið upp av øðrum bátum, at kvotan kundi trífaldast. Um ein



Her síggja vit Leif Harald Hansen, sum er umboð fyri Norske Sjømatbedrifters Landsforening práta við Joe Maddock, sum er formaður fyri írska fiskimannafelagnum. Leif kennir eisini føroyingar, sum hann hevur gingið í fiskivinnuskúla saman við.

Og Joe umboðar millum aðrar flotabólkar ein stóran kraftblokkaflota, sum er 20-30 skip. M.a. hesar er Atlantic Dawn, sum tekur ikki færri enn 7.000 t. Írski flotin er lagdur undir at hava sæð stórt uppá fiskiveiðureglurnar og harvið at hava kunnað fiskað mestsum frítt. Men hetta tykist at hava fingið ein enda nú. Fyri kortum var eitt stórt løgreglutiltak sett í verk, sum staðfesti tað, sum øll hava tosað um. So her kann meira enn so onkur enda aftanfyri rimarnar.

Annars sigur Joe, at tað fyri tíðina eru yvir 2.000 fiskiført í Írlandi. Av teimum eru 1650 før undir 12 m, og 104 før yvir 24 m. Talið á fiskimonnum er gott 6.000. Samlaði landingarnar, seinastu tølini eru fyri 2003, eru 264.000 t. Virðið er uml. 1,5 milliardir krónur. Veiðuvirðið er nøkulunda eins býtt millum uppsjóvarfisk, botnfisk og skeljafisk, sum tað tó verður avreitt mest av. Í Írlandi eru uml. 130 virkir, sum hava uml. 5.000 fólk í starvi. Í aling arbeiða umleið 2.600 fólk. Tað er fimm høvuðsfiskivinnuhavnir.

Írska fiskimannafelagið var stovnað í 1974 av fiskimonnum kring alla oynna. Og felagið er við í fleiri nevndum, sum arbeiða við fiskivinnumálum.



Ole Kock og Ann Beth Skrede eru tveir kunningar frá Norsk Sjømandsforbund, sum vit eisini samstarva við. Ole Kock er upprunaliga dani, ættaður úr Frederikshavn. Men í 1970 fór hann í Barentshavið við einum donskum laksabáti. Og her gjørdist "fast" í eina gentu! Og síðan tá hevur hann búð á Tromsøleiðini. Hann hevur verið fiskimaður alla tíðina, og er nú ein álitismaður hjá norska sjómannasambandinum. Ole býr í lítla býnum Sørreisa, um 130 km frá Tromsø. Tað er sermerkt fyri hesa kommunu, at her hava javnaðarmenn havt meiriluta í býráðnum í 73 ár! Heilt óvanligt fyri ein fakfelagsleiðari, so er Ole virkin í flokkinum Høyre, og hann umboðar flokkin í býráðnum. Men hetta ger tað ikki ómøguligt at umboða fiskimenn á ein virknan hátt.

Ann Beth Skrede komu vit óbeinleiðis í samband við longu í 1980, tá pápi hennara Jan Skrede gjørdist næstformaður í fiskimannadeildini hjá ITF, har Óli Jacobsen var formaður. Jan doyði í 1995, og tá kom Ann Beth, sum annars hevur verið fiskimaður, partvíst at taka hansara pláss. Men í 2002 fóru tey bæði burturúr ITF, og Ann Beth fór eisini burturúr sjómannasambandinum. Síðan er hon komin at arbeiða hjá WWF, World Wildlife Fund, sum er ein virkin umhvørvisfelagskapur, sum eisini hevur verið roknaður sum ein hóttan móti fiskiskapi. Á landsfundinum var Ann Beth umboð fyri WWF, men tað, sum hon mest fæst við, er hóttanin um oljudálking. Tað var sera hugaligt at hitta hana aftur.

t.d. sjálvur hevði eina kvotu uppá 50 t., skuldi kunna bera til at keypa tveir aðrar bátar, sum høvdu 50 t. hvør. Tá fekk viðkomandi 80% av keyptu kvotuni, so samlaða kvotan kundi gerast 130 t.

Hetta uppskotið fekk eina rættiliga harða viðferð frá norsku fiskimonnunum, sum óttaðust fyri, at hetta fer at ganga útyvir talið á fiskimonnum. Og Kystfiskerlaget er harðliga ímóti. Men støðan hjá Norges Fiskarlag er fyri tað fyrsta, at teir vildu ikki hoyra talan um fleiri bygnaðarbroytingar fyri bátar undir 10 metrar. So spurningurin kundi einans vera um bátar 10-15 metrar. Og her gjørdist niðurstøðan tann, at í staðin fyri, at tað skuldi bera til at trífalda kvotuna við umrøddu avmarking, skuldi bert bera til at tvífalda hana. Hetta uppskotið fekk heldur ikki meiriluta frá umboðunum fyri útróðrarmenninar. Avgerandi varð, at reiðarafelagið eisini atkvøddi fyri.

Men annars er tað ivasamt, hvat víðari hendir á hesum økinum. Ein nýggj stjórn er komin, sum ikki verður mett at vera eins íðin fyri bygnaðarbroytingum sum tann undanfarna.

Hetta hevur annars eisini týdning fyri málið um tilfeingisrentu, sum vit umrøddu í seinasta blaði. Fortreytin fyri einum tilfeingisgjaldi er ein verulig tilfeingisrenta, tvs. yvirskot at gjalda rentuna av. Henda er treytað av eini víðgongdari bygnaðarbroyting. Men tað verður mett, at hetta liggur longri burtur, nú nýggj stjórn er komin.

Ofta hevur verið spátt um, at Norges Fiskarlag fór at sindrast. Hetta var eisini spádómurin undan hesum landsfundinum. Men fáir fundir hava verið so friðarligir, sum júst hesin. Hildið var, at tað var óvissan um ta komandi stjórnina, sum fekk fundarumboðini at standa saman.

Av øðrum málum vóru eisini slík sum tryggingarmál, har tryggingin sjálv virkin roynir at økja um trygdina hjá fiskimonnum. Hetta ger hon eisini, tí her er nakað at spara. At tryggja ein starvsmann kostar kr. 500 árliga, meðan tað kostar 30 ferðir so nógv ella kr. 15.000 at tryggja ein fiskimann. Hetta sigur nakað um vágan.

Annars varð formaðurin Reidar Nilsen einmælt afturvaldur, og tað sama var við leiðsluni. Tey, sum hava hug at vita meira um Norges Fiskarlag, kunnu fara inn á heimasíðuna: www.fiskarlaget.no.



Minnisvarðin í viðalundini varð vígdur 22. juli 1956 av Jákup Joensen, prósti. Hann gjørdi tað við hesum orðum:

**So vígi eg tá hetta listaverk til at vera varðveitingarvarði av einum stuttum men sera týdningarmiklum parti av søgu okkara. Eg vígi hann til at vera øllum sjófólki okkara eitt heiðurstekin. Eg vígi hann til at vera teimum, hvørs nøvn her eru skrivað, ein minnisvarði, har steinar og málmur tala um menn, sum undir hættisligum viðurskiftum bóru dagsins tungu byrðu og hoknaðu undir henni í deyðan.**

Minnisvarðin varð avdúkaður av Ruth Poulsen, seinni gift Jensen. Pápi hennara gekk burtur við "Nýggjaberg".

Formaður býráðsins í Tórshavn Palli Henriksen helt eisini vakra talu yvir teir farnu og um tey saknandi eftirsitandi foreldur, konur og børn, eins og hann greiddi frá forsøguni til tað tiltak, sum nú var vorðið veruleiki við reisingini av minnisvarðanum.

Standmyndin var gjørd av norska listamanninum Kaare Orud. Fyristaðið uppsetingina høvdu Lamhauge og Waagstein. Uppsetingararbeiðið varð gjørt av Jacob Simonsen, og steinpláturnar vóru gjørdar av Føroya Mekaniska Grótídnaði.

AGN

sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

## Sjólatin í 2005

Síðan 1. november 2004 er hesin sjómaður farin í sínum virki á sjónum:

Poul Johannes Poulsen, 44 ár, Vestmanna. Sigldi við "Grønanes". Druknaði í Vestmanna 27. mars 2005.

Norðurlendskt samstarv, tá tað er uppá tað besta:

# Maiken giftist álendingi

Í hesum døgum er norðurlandaráðsfundur í Íslandi. Sum kunnugt eru fimm limalond í Norðurlandaráðnum, og so er trý smá lond við einum slagi av atlimaskapi, og millum eru Áland og Føroyar. Hesi londini hava nógv í felag, sum fólkatal og ríkisrættarliga støðu. So tey hava upplagdan áhuga í samstarvi, sum eisini virkar hampiliga væl.

Men fáur hevur tó drivið tað so vítt, sum strandagentan Maiken Poulsen, sum hevur arbeitt á løgmansskrivstovuni síðan 1983. Í sínum starvi hevur hon eisini staðið fyri slíkum samstarvi sum hesum millum londini, og hon hevði eina tíð í 1994 ein skiftisstarv á Álandi. T.v.s. at hon býtti fyri eina tíð starv við almennan starvsmann úr Álandi.

Í 2002 var norðurlendsk dansistevna Havleikur í Havn við luttøka frá m.ø Álandi. Maiken helt tá, at hon skuldi fara at heilsa uppá álendingarnar, og her hittu hon Leif Englund, og tað rann saman teirra millum. Tey høvdu kortini verið rættiliga nær fyrr. Í hesum sambandi fór Maiken nevniliga at hyggja at sínum gomlu myndum úr Álandi í 1994. Og mín sann, um ikki Leif var júst á eini mynd, so kanska er ein neisti tendraður tá! Og í august 2004 giftust tey bæði í Álandi.

Síðan tá hevur Maiken lisið norðurlendskt mál, bókmentir og retorikk í Stockholm og í Uppsala. Nú hevur hon verið her síðan august, og hevur arbeitt parttíð í løgmansumsitingini. Samstundis skal hon gera uppgávu við Fróðskaparsetrið lidna, og so skal hon eiga í februar!

### Stutt um Leif

Júst í hesum døgum hevur Leif verið í Føroyum. Sjálvur havi eg arbeitt saman við Maiken í landsstýrinum og hava vit kenst síðani, og í fyrradagin vóru hon og Leif inni á gólvinum í fiskimannafelagnum, og fingu vit eitt prát um teirra søgu og eisini um viðurskiftini í Álandi.

Leif er føddur 3. desember 1958, og hann er sterkstreymselektrikari. Hann byrjaði í 1991 sjálvur annar fyritøkuna Servicepunkten, sum ger umvælingararbeiði av ymiskum slag. Men mest er tað ravmagn á virkjum, sum arbeitt verður við.

Teir eru 2 eigarar og 3 starvsfólk, sum arbeiða á fyritøkuni, sum eisini er einaumboð fyri stóru týsku fyritøkuni Siemens í Álandi.

Áhugamál hjá Leif eru: bátar og sjólív, sjóbjargingartænasta, rádjór- og fuglaveiða, fólkadans v.m, og sum sagt var tað fólkadansurin sum útvegaði honum Maiken til konu. Hann er ættaður úr Føglø, sum er ein av teimum 16 kommununum, har tað bert búgva einir 600 fólk Hann býr einar 15 km frá Mariehamn, og hann plagar eisini at fara á flot viðhvørt at fáa eitt kók. Hann virkar sera fitligur og fyrikomandi og greiðir fegin frá um sítt heimland.

### Eitt frálíkt land

Vit hava øll hoyrt um Áland, men tað er ikki vist, at øll vita so nógv um hendan oyggjabólkin, sum liggur nøkulunda mitt millum Svøríki og Finland. Tað eru bert fáir tímar við ferju til bæði grannalondini. Tað er so stutt úr Svøríki, at megin-parturin av streyminum kemur higani.

Fyrst er at siga, at har er ikki so høgt sum hjá okkum. Hægsta punkt 129 m, so sjálvt Danmark er fjallaland í mun til Áland.

Men hinvegin hava tey nógv fleiri oyggjar. Tær eru ikki færri enn 6.757 í tali, og tað búgva fólk á 60 av teimum. Tað skal tó sigast, at nógvar teirra samanbundnar við brún. Meðan tað er gott ferjusamband til hinar oyggjarnar.

Tað er áhugavert, at fólkatalið á teimum smærri oyggjunum hevur hildið stand seinastu árini. Veruliga er fólkatalið á bygd økt meira enn í høvuðsstaðnum síðan 1980. Í Álandi verður nevniliga førdur ein veruligur útjaðarapolitikkur, m.a. við at elva fólkinum til at stovna sínar egnu fyritøkur í egnum heimbygdum, sum tað annars eisini er nógv av víða um í Álandi.

Her kann verða nevnt, at tað er eisini ókeypis at sigla við strandferðsluni. Tað verður bert goldið fyri bilar, og hetta stuðlar eisini huginum at støðast.

Samlaða víddin á Álandi er 1527 ferkilometrar, sum er nakað tað sama sum Føroyar. Meira enn helvtin av økinum er tó skógur.

Miðalhitanum er 6 hitastig fyri árið. Hann er frá - 3 stig í januar til +17 stig í august.

### Vóru upprunaliga svenskar

Samlaða íbúgvaratalið er 26.530. Hetta er munandi lægri enn hjá okkum. Ein stórur partur býr í høvuðsstaðnum Mariehamn, har fólkatalið er 11.000. Á bygd búgva 13.000 fólk og í skergarðinum um 2.000. Men sum nevnt er hetta lutfall ikki broytt stórvegis seinastu árini.

Áland var upprunaliga svenskt, men gjørdust oyggjarnar at enda finskar. Men í 1922 fingu teir egna sjálvstýrislóg eftir togan millum londini.

Hetta merkir eisini fólkasamansetingina. Bert 70% av fólkinum eru fødd á Álandi, og hetta talið er í minking, 20% eru fødd í Finlandi og 6% í Svøríki. Men henda blandaða samansetingin er eisini eitt úrslit av, at tað verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa fólk at flyta til Álands. Dyrgt verður eisini eftir álendingum í útlegd at koma heima aftur

92% av fólkinum hava svenskt sum móðurmál, meðan 5% hava finskt, men tað ber ikki til at klára seg á Álandi eisini svenskt. Nú verður finskt eisini lært í skúlunum. Annars eru 90% fólkinum evangelisk kristin.

### Lítið av fiski

Fiskiveiðu er ikki nógv ár. Samlaða veiða er um 3.300 ella 1% av okkara veiðu. Tað er mest strømning, eitt sildaslag, sum verður veitt. Annars hava teir eisini aling, og gevur hetta umleið 3.000 tons.

Áland hevur altíð havt ein stóran handilsflota, og er hann 59 skip, av hesum eru 42 undir finskum flaggi.

Tað er stórur ferjutrafikkur til Álands, bæði úr Finland og Svøríki. Higar koma ikki færri enn 2 mill ferðafólk árliga, og hetta tal er tvífaldað síðan 1980. Hetta gevur nógv arbeiðspláss. Tað verður sagt, at ein stór inntøkukelda hjá tí almenna er skattur á spæliautomatum. Ein onnur stór vinna



*Maiken og Leif.*

er annars dyrking av sukurrótum.

Arbeiðsloysið um 2%, og er hetta lágt. Arbeiðsmarknaðurin er í stóran mun felags við tí finska, soleiðis at sáttmálar verða gjørdur millum finsku feløgini, men tó við atliti til álendsk viðurskifti.

61% av fólkinum býr í egnum húsum, og er hetta munandi minni enn í Føroyum. Stórur partur av fólkinum býr í íbúðarblokkum

Tað er um 15.000 persónbilar á Álandi, og er hetta nakað tað sama sum í Føroyum, hóast nógv lægri fólkatal.

### Stoltir av sínum sjálvstýri

Áland hevur sjálvstýri, men á summum økjum er tað munandi meira avmarkað enn okkara. Skatturin verður innkravdur til Finlands, sum so sendir peningin aftur til Álands. Fíggjarlóg er um 1,7 mia, men Áland hevur ein sjálvberandi búskap, og fær ikki blokkstuðul sum vit. Men m.a. henda skipan ger, at Finland hevur eina munandi størri umsiting í Álandi, enn Danmark hevur í Føroyum. Finland hevur eisini ein landshøvding, ríkisumboðsmann, í Álandi. Á Álandi velja teir 1 lim í finska ríkisdagin, og her luttaka tey eisini í finskum forsetavali.

Her er eitt sjúkrahús við 106 seingjaplássum og eitt sálarsjúkrahús við 32 plássum.

Tey ungu, sum fara uttanlands at lesa, fara fyrst og fremst til Svøríki og nakað nógv fara Finlands. Aðra staðni eru tað fá sum fara.

Her eru 2 høvuðsbløð, Nya Åland og Åland, sum koma út 4-5 ferðir um vikuna.

Tingið hevur 30 tinglimir, nakað sum í Føroyum. Men her er ein heilt annar munur. Av hesum 30 eru tær 11 kvinnur, meðan vit hava 3 av 32. Og í landsstýrinum eru 3 av 7 limum kvinnur.

Tað eru sjey flokkar á tingi, og teir hava frá 7 til ein lim. Og tað er bert ein flokkur við tveimum limum, sum vil hava loysing frá Finlandi. Hetta merkir eisini, at Álendingar eru stoltir av síni sjálvstýrisskipan og rósa henni tá teir kunnu. Hvussu tað er í Føroyum hesum viðvíkjandi er óneyðugt at siga nakað um!

Almenna umsitingin er undir sama taki, og hetta er uttan iva ein fyrimunur í mun til Føroyar, har eingin veit av hvørjum øðrum.

Áland hevur eisini eina greiða støðu til ES. Tá fólkaatkvøða var um spurningin vildu 73% inn í ES, men valluttøkan var lág, minni enn 50%.

Áland fekk flagg í 1954 og egin frímerki í 1984.

### Eitt gott samfelag

Maiken heldur, at Áland er eitt sera gott samfelag at búgva í. Her er m.a. eingin bíðilistar til barnagarðar og ellisheim.

T.d. er barsilsfarloyvi við løn eitt ár. Men afturat hesum kunnu barnakonur hava farloyvi við almannahjálp í tvey eyka ár. Og hetta minkar um tørvin á barnagarðsplássum, tí nógv velja at passa síni børn heima.

Tað er víst nógvir persónbilar, men býbussarnir eru ókeypis, so tað ber væl til at klára seg uttan bil.

Og nú hevur Áland eisini fingið sítt egna flogfelag, nevniliga Air Åland, sum í fyrsta umfari skal flúgva til Finlands fleiri ferðir um dagin. Og hetta skal ikki kosta nógv, bert 300 kr. hvønn vegin.

Tað var hugaligt at fáa hetta prátið við Maiken og Leif, og vit ynskja teimum eydnu framyvir.

*ó.*

---

Tíðindaskriv frá postverkinum:

## Fleiri nýggj postnummur

Postverkið hevur gjørt av frá 1. november 2005 at økja um postnummrini. Talan verður um, at postsmogur á størstu posthúsunum kring landið fáa egið postnummar. Frammanundan hava postsmogur í Tórshavn og á Argjum egið postnummar. Nýggju postnummrini verða:

| | | |
|---|---|---|
| 215 | Sandur | (postsmogur) |
| 355 | Vestmanna | (postsmogur) |
| 375 | Miðvágur | (postsmogur) |
| 405 | Oyrarbakki | (postsmogur) |
| 535 | Fuglafjørður | (postsmogur) |
| 610 | Saltangará | (postsmogur) |
| 710 | Klaksvík | (postsmogur) |
| 810 | Tvøroyri | (postsmogur) |
| 910 | Vágur | (postsmogur) |

Aftrat hesum fær **Válurin** í Vestmanna egi postnummar. Hetta verður postnummar **358 Válur.** Válurin er partur av Kvívíkar Kommunu. Tilskriftin á posti til Válin skal í framtíðini skrivast á fylgjandi hátt:

**Persónsnavn**
**Gøtunavn og húsanr.**
**358 Válur**

Viðskiftarfólk, sum hava postadressu á nevndu støðum, verða biðin um at taka við nýggju postnummrunum skjótast til ber. Her skal serliga hugsast um at broyta forprentað brævapappír og bjálvar og broyta adressur í telduskráum og ikki minst at boða postsendarum frá broytingini, t.d. almennum stovnum, telefelagnum, oljuveitaranum o.l.

yvirlærari, Matras, Venningsted, Kamban og Davidsen. Allir vóru teir góðir lærarar. Minnist nakrar av dreingjunum í okkara klassa. Kaj sum eg sat saman við, var hjartasjúkur og doyði ungur. Eivind, Øssur og Diaba, Rólant og Terji o.a. Luftálopsávaring var av og á, meðan við vóru í skúla og so máttu vit í luftverjuskýlið.

Hermenninir vóru serliga blíðir um jóltíðir. Tá høvdu teir veitslur og vístu film, m.a. "Donald Duck" og øll fingu gávur, mest slikkarí. Seinni fóru vit í Realskúlan, har lærararnir vóru Christoffur Lützen, yvirlærari, Hans Andr. Djurhuus, Jochumsen, Frk. Cohr, J. Kjeld, øll sera dugnalig lærarafólk.

Hans Andreas Djurhuus plagdi at yrkja tað, sum hann vildi hava okkum at skriva niður. Jochumsen var eisini fimleikalærari, og vit plagdu at fara niðan í Gundadal í shorts á vetrardegi at spæla fótbólt.

Í klassanum vóru børn ymsastaðni úr Føroyum, minnist Eigil, Sigurd, Hans Mikal, Jeffri, Karin, Clara, Ingibjørg. Hóast kríggj var og luftálop, har "Lincoln City" varð søktur o.a., so høvdu vit tað stuttligt um vetrarnar. Tá var meiri kavi um vetrarnar enn nú, so vit skreiddu við sparkara oman eftir bankabrekkuni og heilt oman í Vágsbotn. Tá vit vóru á skoytum, hingu vit uppi í bilunum hjá hermonnunum – tá bar alt til. Tey ungu fingu frið og blivu ikki "jagstrað", sum tey møguliga verða nú. Sorgarleikir vóru nógvir. Nógv mistu pápar, abbar og beiggjar, tá ið skip blivu burtur. "Carolina Torden" bleiv bumbað í Nólsoyarfirði, og bumbur vóru á landi, men ein vandist við luftalarmar. Minnist at dúgvurnar fóru á flog runt um býnum, hvørja ferð luftalarmur var. Nakrar grindir vóru eisini, og hermenninir hjálptu til. Havnará lá opin tá, og yvir av kommunuskúlanum vóru stórir "hyljar" við vatni til brandsproyturnar.

Um summarið var vakurt at fara niðan í kolonihavarnar á Ternuryggi. Fosturpápin plagdi at vitja Sophus Christiansen, sum hevði eini hús har uppi, og har var sera gott útsýni.

### Lívið hjá hermonnum í Havn

Í Havn bygdu bretsku hermenninir barakkir alla møguliga staðni. Yvir av hjá Bil Óla var eisini ein "fish and chips" handil eins og størsti NAAFI handilin hjá hermonnunum. Hvønn dag komu hermenn marsjerandi við sekkjapípum á odda oman á Vaglið, og tá vórðu vaktirnar skiftar út. Hermenninir høvdu vakt ymsa staðni í býnum. Eg plagdi at forarga soldátarnar, sum eg kendi, og spurdi teir, hvat slag av vápnum teir høvdu, sum gingu aftastir. Har gingu hermenn við sleggju í staðin fyri við riflu og við ketildrakt undir arminum. Hetta var revsingin fyri at hava gjørt okkurt ella at hava skikka sær illa á onkran hátt. Sleggjurnar skuldu so nýtast til at banka blikkdósir saman. Dósamatur var jú ein stórur partur av matinum hjá hermonnunum, og hesir máttu so banka dósirnar saman, so tær tóku minni pláss, tá dósirnar vórðu sendar aftur til Onglands til endurnýtslu. Tað var onkuntíð, teir klandraðust eitt sindur. Eg minnist serliga ein hermann, sum onkuntíð plagdi at fáa ov nógv upp í høvdið, og sum tá hevði hug at gerast eitt sindur harðligur. Eg minnist, at hann var tikin einar tvær ferðir av hernaðarpolitinum. Tá visti eg ikki, at hesin maðurin var úr Aberdeen.

Tá ið eg kom niður til Aberdeen at búgva, síggi eg, at hann starvast á fiskamarknaðinum sum landingarmaður. Eg spurdi hann, um hann ikki var í Havn undir krígnum. Hann gjørdist eitt sindur lotur, men eg sigi við hann, at eg minnist til hansara, og at hann plagdi at boksast eitt sindur. Ein annar maður var kokkur hjá hermonnunum í Søldarfirði. Hann arbeiddi víst á eini mjølgoymslu. Hann hevði eg samband við av og á í Aberdeen.



*Fiskidokkin í Aberdeen er inni í trýkantinum fremst á myndini. Har varð fiskurin seldur á uppboði.*

### Konsulin giftist

Eg minnist eisini sera væl konsulin Mason og Karen, konu hansara. Eg minnist, tá ið tey giftust. Karen arbeiddi hjá Kaaber tannlæknanum. Tá ið eg onkuntíð seinni plagdi at fara út í Tinganes, tók eg onkuntíð til, at tað var munur á, tá ein kom skelvandi upp trappurnar til tannlæknan, har løgmaður nú heldur til.

Tað var heldur illsligt veður, tá ið konsul Mason og Karen giftust í Havnar kirkju. Minnist væl at frk. Cohr, lærarinna okkara í Realskúlanum, var boðin í brúdleyp og minnist hana fara inn í kirkjuna í einum flottum kjóla. Eg havi samband við Sir Frederick og Lady Karen Mason enn. Fyrrárið høvdu tey diamantbrúdleyp.

### Hitti Mason saman við Paula Ellefsen

Pauli Ellefsen, var á vitjan sum løgmaður í Bretlandi í 1982 saman við Árna Olafsson. Hann er fyrsti løgmaður, sum hevur vitjað á einum boripalli. Árni Olafsson og eg vóru við honum. – Eg havi eisini verið á boripalli saman við Anfinn Kallsberg, løgmanni, vist í 1999. – Tað ferðina Pauli Ellefsen var og vitjaði vóru vit runt alt Bretland. Tá skipaði Foreign Office fyri einum døgurða. Har var nógv fólk. Undir liðini á mær situr ein, sum hevði arbeitt við skandinaviskum málum í uttanríkisráðnum. Tá kom eg eftir, at her var ein Mason til staðar. Eg bað mín síðumann kanna, um hetta kundi vera sami Mason, sum hevði verið konsul undir krígnum. Tað var tað, og hann vildi fegin hitta meg. Vit prátaðu saman, og Pauli Ellefsen bjóðaði honum at koma til Føroyar at vitja, og tey komu eisini árið eftir. Eg havi síðani havt samband við tey bæði, og havi hitt tey viðhvørt.

Tá ið eg hevði arbeitt 50 ár á umboðsstovuni, hevði danski sendiharrin í London ein døgurða fyri okkum, og her vóru Mason hjúnini eisini við. Nú er hann uppí í 90-unum. Tey bæði eiga í hvussu er tveir synir.



*Abbi og omma Sofus, Dánjal og Magnina, saman við børnunum.*

*Aftast t.v. er Óli, pápi Sofus, og síðan Petur, sum endaði sínar dagar í Esbjerg. Petur misti pápa, beiggja og son á sjónum. Frammanfyri døturnar, 85 ára gamla Sanna (Jacobsen), tv. sum býr í Syðrugøtu og Kathrina (Klakk), sum giftist til Klaksvíkar.*

### Býdrongur hjá Hans Joensen

Undir seinna heimsbardaga var eg býdrongur hjá Firma Hans Joensen, Kolonial og Manufaktur í Niels Finsensgøtu í Havn. Petur Guttesen var eisini býdrongur har. – Hesin handilin var at rokna sum ein stórur handil tá í tíðini. Hans og Rudolf Joensen vóru stjórar og Kissa Christiansen var bókhaldari. Valborg var fyristøðukvinna í klædnadeildini í erva. Afturat Rudolf vóru Evald Fuglø og Hans Jacob, kollfirðingurin nevndur, – seinni byrjaði hann pylsuvirki, og tíverri var hann ein av teimum sum doyðu í flogvanlukkuni í Mykines í 1970.

Vit høvdu ov mikið at gera, og kundarnir vóru víða um í Havnini, minnist nakrar teirra, eitt nú Axel Jensen, úti í Ljósinum. Eingi gøtuljós vóru og myrkalagt varð vegna kríggið, sum herjaði. Tað var langt at fara út "í Ljósið" myrkar vetrardagar. Eisini var langt at fara út til Amaliu Mohr, yviri við Strond, og har vóru fá hús á leiðini. Danskur telegrafistur búði við Hoyvíkstjørn. Hagar var eisini langt at fara tá.

Aðrir kundar vóru frú Bech, kona djóralæknan, hon var donsk og frú H. O. Hansen, dani, frú Hans Sundstein, frú Albert Niclasen. Maðurin var – minnist meg rætt – skipari á "Dúgvuni". So var tað frú Sigurdjónsson, sum hevði íbúð í KFUK. Maðurin var stjóri hjá íslendska heilsølufelagnum Helgason og Melsted. Har starvaðust eisini fosturpápi mín John, Erling Michelsen og Bambus.

Ein annar kundi var frú Anna Askham, sum doyði fyri kortum 104 ára gomul. Tey búðu omanfyri plantasjuna. Kona Arthur – beiggja Símun – var eisini kundi hjá "okkum". Reginus Vilhelmsen, búði omanfyri KFUK, sum koyrdi taxabil, var eisini kundi. Hann átti ein flottan Chevrolet bil. Umframt hann og Júst Sivertsen var Hans Johannus í Kina eisini taxasjauførur undir seinna heimsbardaga. Júst Sivertsen átti eisini lastbil. Hann var fyrsti maður í Føroyum, sum átti og koyrdi bil. Ein annar var Bil Óli sum hevði lastbil. Um summarið brúktu vit býsúklu og um veturin sparkara, tá ið kavi var, at flyta handilsvørurnar við. Ikki var altíð so tespiligt, tí veðurlíkindini tá vóru eins og tey eru nú.

Maður Onnu Askham var Símun, jarnsmiður og kavari. Minnist væl, at hann var kavari, tá ið fyrsta keiin bleiv gjørd í Norðragøtu undir seinna heimsbardaga.

Hvørja ferð hann kom upp, skrúvaðu teir "vindeyga" av og koyrdu snús í munnin á honum. Sum tey eldru minnast, brúkti hann nógv snús. Símun gjørdi eisini nógv arbeiði sum kavari fyri bretsku krígsmarinuna, og hann fekk serligt certifikat frá Royal Navy fyri hetta. Minnist eisini, at eg hjálpti honum fyrst í 1950-árunum at melda seg inn í Blacksmith's Union her í Bretlandi, vegna tess, at hann var komin niður at arbeiða í Skotlandi, Leith og Inverkeithing í Fyfe, har teir høgdu upp bæði gamlar Atlantic Liners og krígsskip. Minnist meg rætt kom Anna eisini niður til Skotlands at búgva saman við Símun eina tíð.

Seinasta tiltakið hjá Símuni, sum eg minnist úr Føroyum, var, at hann kavaði í sambandi við at spreingja leivdirnar av "Lincoln City" burtur, tí armeraða bretska trolaranum, sum var torpederaður á Havnarvág í 1941. Tann dagin, Símun skuldi spreingja "Lincoln City" í "luftina", fingu øll í Havnini boð um at halda seg innandura, har sum ein hevði mest skýli og at hava vindeyguni opin, so eingin skaði skuldi standast av spreingingini. Vit, sum úti vóru, sóu hvat hendi. Tað sá bert út sum, at sjógvurin reisti seg upp og ein alda stóðst av spreingingini. Deyður fiskur fleyt allastaðni, og bátar fóru út at taka fiskin upp.

Tá ið eg kom heim – vit búðu tá har, sum DER-TV handilin nú er ella var – tá var eingin at síggja. Eg rópti: "Er nakar inni". Tá sótu tey øll inni undir trappuni. Tey høvdu sjálvandi einki merkt til brestin.

*Framhald á næstu síðu*

Ja, nógvar slíkar hendingarnar vóru undir og eftir seinna heimsbardaga.

### Fluttu til Klaksvíkar

Fosturpápin fekk síðani starv sum stjóri hjá J. F. Kjølbro á Biskupsstøð í Klaksvík og vit fluttu til Klaksvíkar, har vit báðir gingu í Realskúlan. Alexander Enniberg var yvirlærari og hinir lærararnir vóru Hákun Djurhuus, S. P. Zachariassen, Sámal Petersen, Linda og Knud Pedersen, Jensen, dani. Allir góðir lærarar, og tá vit vóru fá í klassanum, vóru vit noydd altíð at lesa væl uppá. Umframt okkum báðar vóru Svein Juul Frederiksen, John Matras, Thorleif Thorgeirsson, Ísak Matras, Andrias Isaksen, Viðareiði, Brita Biskupsstøð, Elinborg Poulsen, Mikladal, Anna Gardar, Eva Joensen, Bussi Petersen, Hjørdis Nolsøe, Sigrid Andreasen. Trongligt var við skúlastovum, og vit máttu ganga út í Vevskúlan úti í Grøv summar dagar, har var tó gott at fara á sumri.

Tá ið luftálopsávaring var, fóru vit í kjallaran, har luftverjuskýlið var. Hákun Djurhuus plagdi at fáa okkum upp á gólv at dansa føroyskan dans, so vit gloymdu, at tað var luftálopsávaring. Hákun var eisini fimleikalærari, og vit plagdu at fara undir kalda brúsu, tá vit høvdu gjørt fimleik. Um veturin kundi henda, at vatnrørini vóru fryst. Teir, sum ikki hættaðu sær undir brúsu, fingu í staðin livralýsi ...máttu hava egna skei við. Um summarið var fótbóltur og svimjing úti í Grøv.

### Varuforsýning og so niður

Tað fyrsta eg var í landsins tænastu var í Varuforsýningini. Almenna navnið var Færøernes Offentlige Vareforsyning, og summi kallaðu tað Landshandilin. Alt, sum var rationerað, bæði til fólk og fæ gekk ígjøgnum varuforsýningina.

Eg minnist, at eg var á keiuni, tá "Nova" fór niður til Bretlands beint eftir kríggið. "Nova" var eitt norskt troppaskip, sum sigldi til Íslands, og tað sigldi nógv uppá Føroyar. Har vóru systkinabørn hjá mammu við. Nógvar av gentunum, sum giftist við bretskum hermonnum, fóru niður við "Nova" beint eftir krígslok. Eg minnist, at Turid Potts var ein teirra. John beiggi og eg fóru niður í apríl 1946. Mamma og restin av familjuni fóru eitt hálvt ár seinni við "Atlantsfarinum". Eg og John fóru við "Liljuni" úr Klaksvík.



*Mynd frá 1952. F.v. John, beiggi Sofus, sum býr í Runavík, Óluva, sum býr í Kanada, Nessie, kona Sofus og Sofus.*

Hans Jacob Ellingsgaard:

# Ein sjómansins hetja

Í sambandi við umrøðuna av okkara sjófólki undir krígnum hevur Sofus Poulsen í Aberdeen skrivað hesar hugleiðingar um Hans Jacob Ellingsgaard:

Í hesum døgum verður nógv skrivað um teir, sum sigldu og sjólótust undir seinna heimsbardaga. Men tað vóru eisini onnur, sum ikki sigldu, men sum høvdu neyvt samband við okkara siglandi fólk.

Ein teirra var Eiðismaðurin Hans Jacob Ellingsgaard, sjómanstrúboðari.

Tað fyrsta sambandið, eg hevði við Ellingsgaard, sum hann var kallaður í Aberdeen, var eftir, at eg var komin niður higar í apríl í 1946. Tá var ein lesistova í Broad Street, har okkara sjómenn kundu vitja, og her virkaði Ellingsgaard. Hann kom niður higar at vera okkara sjómonnum til hjálpar, og var tað Heimamissiónin, sum stóð aftanfyri hansara starv her. Hann kom vist niður uml. 1942, og seinni hevði hann konuna og yngru børnini Jensinu, Katrin, Brynjálv og Signhild við sær.

So løgið sum tað kann tykjast, so kom eg eisini at kenna ein mann her, Albert Caie nevndur, sum hevði verið í Royal Air Force í Føroyum undir seinna heimsbardaga. Hann var stationeraður á Radarstøðini á Eiðiskolli og eisini á Akrabergi, so hesin kendi fleiri Eiðisfólk eins og Sumbiarfólk. Hann var hvíthærdur, hóast bert um 37 ára gamal, og varð nevndur "gamli maður" av teim lokalu. Hann dugdi væl at spæla orgul og plagdi eisini at spæla orglið í kirkjuni. Líknandi hendi í Sumba, og hann hevði sum nevnt nógvar góðar vinir í Føroyum. Tað fyrsta, sum hann minnist til H. J. Ellingsgaard, var, at hann var ein av teimum, sum bóru tilfar o.a. niðan á radarstøðina á Eiðiskolli. Ellingsgaard og Albert Caie gjørdist vinmenn fyri lívið. Albert Caie vitjaði Føroyar einaferð stutt eftir kríggið, og hann fór heim við nýggja bátinum hjá Sofus Bech, skipara, "Ósi" nevndur.



*Hans Jacob á útferð við føroyskum sjómonnum.*





*Hetta var svenska sjómanskirkjan í Aberdeen, har okkara fiskimenn eisini komu.*

### Hans Jacob í Aberdeen

Aftur til arbeiðið hjá Ellingsgaard í Aberdeen. Hann var altíð umborð á skipunum, tá ið tey komu í havn. Umframt at geva teimum "góð orð", hevði hann eisini ymiskt til lesna at geva teimum, sum tey føroysku bløðini, sum bæði lesistovan og umboðsstovan fingu sendandi niður hvørja viku. Ein svenskur sjómansprestur var eisini í Aberdeen, pastor Nordin, ein rættur gentlemaður. Okkara sjómenn fingu so høvi at fara niðan á lesistovuna at lesa bløðini ella at skriva brøv o.a., og fingu teir sjálvandi eisini ein kaffimunn og køku.

Eftir kríggið komu sera nógvir svenskir snurruvodsbátar higar at landa. Svenska kirkjan keypti ein kirkjubygning, sum stóð miðskeiðis inn frá longu trappuni frá havnini upp á Castle Gate, nærhendis har Salvation Army Head Quarters er. Ein annar av okkara sjómonnum vælkendur bygningur var eisini har á leið, nevniliga "Hunters" møbul og "altmøguligt" handil.

Nevnda kirkja varð so sett í stand og varð vígd av svenska Biskop Eidem. Umframt kirkjuna, so vóru eisini onnur hølir har. Her var lesistova, sjónvarp, spælistova og matstova, har ein fekk kaffi og køkur. Ein føroysk lesistova var eisini har. Har komu eisini nógvir danir og norðmenn, og kirkjan var vanliga nevnd The Scandinavian Church. Umframt fiskiskip komu eisini nógv skandinavisk farmaskip til Aberdeen, og komu hesar manningar eisini á vitjan hagar, tí bløð vóru her frá øllum teim skandinavisku londunum, sum hesir sjómenn so kundu lesa fyri at frætta hvat fyrifórst heima. Umframt gudstænastur plagdi Ellingsgaard og pastor Nordin at fyrireika útferðir við bussum. Eitt nógv vitjað pláss var "up Royal Deeside" til Glentanar Estate. Kona Lord Glentanar var norsk, og vóru skandinaviskir sjómenn altíð vælkomnir at vitja hagar. Sjómenn vóru eisini innlagdir á sjúkrahús, og vitjaði Ellingsgaard eisini hesar.

### Var ein hetja

Ikki mundi tað altíð vera so lætt at vera sjómannstrúboðari, men Ellingsgaard var ein sera fittur maður, og var við síni stillu medferð væl búgvin til hetta starv. Skandinavar sum búðu á Aberdeenleiðini vitjaðu sjálvandi eisini The Scandinavian Church og umframt frammanfyri nevndu hendingar vóru av og á eisini Musical Evenings, fyrilestrar o.a. hildnir í kirkjuni. Ellingsgaard var í Aberdeen fleiri vetrar eftir krígslok, tí tey flestu av okkara skipum hildu fram at landa ísfisk her líka til byrjað varð at byggja flakavirkir heima, har fiskurin kundi vera landaður. Men fleiri hildu fram við at koma niður at landa.

Seinnu árini av lívsstarvi sínum var Ellingsgaard okkara sjómonnum í Grønlandi til hjálpar, einamest á Ravns Stóroy. Hann var sjálvandi eisini ein góður stuðul hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum heima á ellisárunum, og hann var yvir 90 ára gamal, tá ið hann fór foldum frá. Ein sonn hetja og okkara sjómonnum ein trúgvur tænari meginpartin av lívi sínum.

Annars skrivar Hans Jacob meira um sína tíð í Aberdeen í endurminningarbók síni "Birita", sum annars var navnið á báti hansara, sum hann hevði mong ár í Grønlandi.

Nýggjur møguleiki fyri oljusparing:

# Magnetir kunnu spara munandi

Nógv verður tosað um ta dýru oljuna og bensinið, sum kostar bæði vinnu og privatfólki nógv. Hetta ger tað sera umráðandi við tiltøkum at kunna spara orku. Hetta er ikki minst galdandi fyri skipini har oljan tyngir serliga nógv.

Men tað hevur verið avmarkað við ítøkiligum stigum. Kortini er okkurt, sum t.d. at summi skip kunnu fara at nýta tunga olju, sum er nakað bíligari, og onnur kunnu fara at partrola, sum er minni orkukrevjandi enn troling við lemmum. So er eisini at nýta alla motororku optimalt, so ikki siglt verður so bíliga sum gjørligt. Her hevur verið tosað um eina íslendska telduskrá, sum skal kunna stýra hesum, men her er kostnaðurin so mikið stórur, at tað í besta lagi tekur langa tíð at vinna hann inn aftur.

Spurningurin hevur so eisini verið, um tað reint tøkniliga ber til at fáa meira burtur úr somu nøgd av olju. Tað hevur verið tosað um nýggjar orkusparandi skrúvur. Men hetta er alt slíkt sum tekur tíð at menna.

SuperFuelMax

**Bedre luft/drivstoff-blanding gir bedre drivstofføkonomi**

SuperFuelMax er to ekstremt kraftige magneter som man klipser på drivstoffsrøret så nær forbrenningen som muligt. Gjennom prinsippet magnetisk resonnans gis drivstoffpartiklene en magnetisk ladning slik at dråpene knuses.

HC-molekylene frastøter nå hverandre og på den måten oppnås en bedret forbrenning gjennom sterkere HC/Oksygen-binding.



Illustrasjonen viser hvordan magnetfeltets ressonansfrekvens "smuldrer" opp HydroCarbo dråpene og gir plass til flere oksygenmolekyler i drivstoffgassen.

*So einfalt er tólið, sum kann minka munandi um orkunýtsluna á motorum.*

Men nú um dagarnar frættu vit um eina lítla kollvelting á økinum. Og hon er so einføld, at hon er nærum ótrúlig.

Tað er talan um serligar magnetir, sum verða settar á oljurørið so nær forbrenningina sum gjørligt. Hetta skapar eina fínari forstøving og harvið reinari forbrenning av oljuni, so meira fæst burtur úr henni. Skipanin kallast Super FuelMax.

Upprunin er eitt uppfinnilsi hjá General Motors, sum vísti seg at kunna spara bensin og oljunýtsluna hjá bilum. Upprunaliga bar bert til at fáa hesa útgerð í samband við keyp av bilum frá hesi fyritøku. Men sum frá leið varð so nógvur stuldur av hesi útgerð úr bilum, at General Motors avgjørdi, at hon skuldi kunna fáast í fríum handli. Og nú fæst hon so eisini í Føroyum.

Í sølutilfar um skipanina sæst, at hon kann minka orkunýtsluna við 5-20%. Afturat hesum kemur, at útstoytsgassið kemur at minka við 50-95%, sum merkir reinari motorar, og minni viðlíkahald. Hetta kemur aftur at merkja eina øking á maskinorkuni 5-10%, sum so aftur kemur til góðar í orkukostnaðinum. Ein annar fyrimunur er, at vit kunnu minka um ta luftdálking, har Føroyar sigast at vera mestsum heimsmeistarar.





*Her sæst, hvussu magnetirnir verða settir á oljurørini. Nú er møguligt at minka oljuútreiðslurnar munandi.*

### 10% oljusparing

Vit hava tosað við skiparar, har teir hava nýtt hesa útgerð. Tað er greitt fatanin, at oljuorkan hjá teimum er minkað. Uttan at tað enn er vísindaliga prógvað, so vísa fyribils tøl eina sparing uppá røttu megin 10%, og hetta ger so vissuliga mun við teimum oljuprísum, sum vit síggja.

Og tað mest ótrúliga er kostnaðurin. Hann liggur frá undir kr. 10.000 fyri teir heldur smærru motorarnar til um kr. 25.000 fyri teir heilt stóru. Kostnaðurin kann vinnast inn aftur eftir heilt stuttari tíð. Tað er 7 ára garanti, og útgerðin krevur einki viðlíkahald.

Skipanin kann eisini nýtast til oljufýr heima og til bilar. Vit hava tosað við umboðið í Føroyum, Elmar Petersen. Hann hevur roynt skipanina í sínum bili, og royndirnar vísa greitt, at bilurin koyrdi munandi longri uppá hvønn litur.

So sigast kann, at her er nakað at heinta hjá so væl borgarum sum vinnutólum, ikki minst skipum.

Afturat hesum kemur, at oljuprísurin á marknaðinum hevur hug at falla nakað, og hetta skuldi so eisini gjørt sítt til at hjálpa uppá støðuna.

Einaumboð í Føroyum er:

SatNav
Janstovugøta 28 kj.
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 317413 Fax: 317413
Fartelefon: 221017
T-postur: elmarp@kallnet.fo






FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 353 - 27. oktober 2005

Bjargingar undir krígnum:

# Teir sum bóru boð í bý

Óneyðugt er at endurtaka, at tað vóru nógvar sorgarsøgur undir krígnum. Hetta eru talið "fleiri enn 200 sjólátnir" í sær sjálvum prógv um.

Men tað vóru eisini bjargingar, og fleiri av teimum vóru einastandandi og vitna um, hvussu nógv menniskja – hóast – alt kann standa ímóti. Vit fara her at hava eina umrøðu av teimum skipum, sum fórust av krígsávum, og har manningingarnar fult ella partvíst vórðu bjargaðar. Hetta er eisini ein partur av okkara sjómannasøgu.

"Union Jack"

Teir vórðu søktir tann 22. september 1940 av einum týskum kavbáti 100 fjórðingar sunnanfyri Føroyar. Tá kavbáturin legði á teir, fór manningin í tann minna bátin, og tá ið skipið var skotið til botns var at vinna upp land. Teir vóru eins langt frá Hebridunum sum Føroyum. Men eftir umstøðunum hildu teir tað vera frægast at halda suður eftir. Teir byrjaðu rógvingina við at syngja: "Befal du dine Veje" eftir gomlum sjómannasiði. Teir vóru sjey mans í bátinum, men tað vóru bert 4 árar. Tískil kundu teir skiftast at rógva. Teir høvdu ongan mat, einki vatn, næstan eingi oljuklæði, einki at oysa við og ongan møguleika at geva boð frá sær. Teir mettu, at við verandi líkindum høvdu teir 40 tímars róður fyri framman. Men skjótt kom eitt gul, har ættin var til vildar, og teir settu segl. Og tá gekk skjótt. Men gulið gjørdist til storm, og tað fór at bróta inn í bátin. Einki var at oysa við, so teir máttu taka stivlarnar til endamálið. Báturin var fleiri ferðir fullur av sjógvi, men kapokkpúturnar bjargaðu teimum frá at søkka. At enda máttu teir strika seglið og leggja bakk.

Teir sóu einaferð skip og royndu at blussa, men hetta gjørdi ikki mun. Teir høvdu sæð vitan í Stornoway, og høvdu hann sum stavnhald alla tíðina. Men teir vistu eisini, at her var vandamikið at sigla og at lættliga kundi siglast á ein boga ella sker. Men við hegni og eydnu eydnaðist teimum at koma á eina lítla oyggj beint við vitan. At teir yvirhøvur komu á land, mettu teir sum eitt undur í sjálvum sær. Nú var tað 24. september og tveir dagar vóru farnir.

Teir fingu samband við fólk á vitanum, og vórðu vegleiddir at koma hagar, og her vóru teir væl móttiknir. Síðan komu teir til Aberdeen og heim aftur við "Wilhelminu" aftaná eina einastandandi bjarging.

Skipari var Viggo Dam úr Vestmanna, sum átti skipið saman við John Olsen. keypmanni.

"Tór I"

10. desember 1940 verður "Tór 1" minusprongdur undir Íslandi, men øll manningin bjargaði sær til lands. Tað var Tórfelagið, sum átti "Tór 1" og seinni fór "Tór 2" eisini.

"Beinisvørð"

"Beinisvørð", sum J.Dahl í Vági, átti, varð álopin av týskum flogfari 26. mars 1941. Skipið fór at leka, og manningin royndi til fánýtis at halda skipið lens. Tað endaði við, at manningin varð bjargað umborð á "Eysturoynna", sum fylgdist við teimum, og manningin varð førd til Havnar. Skipari var Jógvan Chr. Sofus Johannesen úr Vestmanna.

"Næraberg"

P/F J.F. Kjølbro átti trolaran "Næraberg". Tann 26. apríl 1941 fóru teir at sigla til Bretlands at landa. Men gott 100 fjórðingar úr Føroyum vóru teir álopnir av einum týskum flogfari, sum fór at skjóta eftir teimum og at blaka bumbur. Hetta endaði við, at skipið fór at søkka, og manningin fór í bátarnar. Teir sigldu og róðu í 30 tímar, áðrenn teir komu til Súlusker, har teir vóru væl móttiknir. Skipari var E. Mohr.

"Emanuel"

"Emanuel" var roknað fyri at vera eitt av Føroya bestu motorskipum, bygt í 1931 á skipasmiðju í Frederikshavn.

Tann 13. mai 1941 var "Emanuel" stødd 18 fjórðingar vestanfyri Mykines á veg heim úr Íslandi við fiski. Uttan ávaring vóru teir álopnir av einum týskum kavbáti, og í fyrsta umfari varð stórbáturin skotin í sor. Teir 3 av manningini, sum fóru at seta tann stóra bátin út – hann stóð frammi á bógnum – hvurvu og sóust ikki aftur. Síðani var lítlibátur settur út, og fimm mans fóru í hann. Men hesin báturin var eisini gjøgnumgataður av kúlum og lak. Men teir fingu tett lekarnar við sekkjum. Eftir 7 tímar í bátinum, sá "Ólavur" av Vestmanna, sum var á útróðri, teir, og tóku menninar umborð.



*Hetta var støðan hjá mongum sjómanni ikki bert undir 2., men eisini undir 1. heimsbardaga. Ingálvur av Reyni teknaði.*

"Harry"

Tann 24. mai 1941 fór Vágsskipið "Harry" úr Aberdeen til Føroyar. Á leiðini vórðu teir álopnir av týskum flogfari. Roynt varð at skjóta aftur ímóti, og flogfarið rýmdi og fleyg móti einum øðrum skipi. Bjargingarbáturin var so gjøgnumgataður av kúlum, at hann neyvan hevði verið til nakra hjálp. Men manningin varð tikin umborð á vestmannaskipið "Fram" og Tvøroyraskipið "Isabellu". Reiðari á "Harry" var Poul Johannes Beder í Vági.

"Sjóborg"

Tann 13. august 1941 var "Sjóborg" antin rakt av torpedo ella minu, og forskipið fór í sor. Tríggir mans hvurvu, meðan teir fimm, sum livdu eftir, vóru komnir í ein bát, sum var eitt lekasáld. Teir vóru illa klæddir og eingin var kumpassin. Teir vistu, at Føroyar vóru næsta land. Men kundu teir finna hesar smáu oyggjar uttan kumpass? Teir máttu so royna. Teir settu segl og løgdu árar út. Klokku høvdu teir, og so miðaðu teir seg eftir sólini, eftir alduskoti og vindi. Um náttina hómaðu teir sólarglæmuna á luftini fyri norðan, og nýttu teir hana eisini til kumpass. Morgunin eftir sóu teir land. Suðuroyggin var beint fyri stavn. Væl var ætlað um kós uttan kumpass.

Um 4 tíðina koma teir inn fyri Sumba. Sumbingar mundu síggja, at hetta vóru fremmandir menn, sum leitaðu móti landi. Teir fóru út við báti at hjálpa teimum at lenda.

"Sólarris"

Tann 19. august 1941 minusprongdist "Sólarris" undir Íslandi. Fimm av manningini hvurvu, meðan teir tríggir, sum eftir vóru, komu á ein flaka, har teir vóru heilar 78 tímar. Tað er ein drúgv frásøgn um hesa hending í bókini Víkingasynir, so her skal bert gerast ein samandráttur.

Vansin við flakanum var, at hann kundi ikki rógvast og rak í fyrsta umfari bert aftur og fram. Men seinni fingu teir kortini rigga árar til, so teir kundu førka seg úr stað. Tað var nógvur mjørki, so ringt var at síggja og ringt at verða sæddir. Teir komu fleiri ferðir fram á skip, og teir royndu, alt teir kundu, at gera vart við seg, men ferð eftir ferð fóru hesi skip framvið uttan at varnast teir. Einaferð kom enntá Vágaskipið "Henry Freeman" so nær, at teir sóðu menn umborð, men sama gjørdi.

Tað ringasta var, at teir høvdu hvørki vátt ella turt, og var hetta eina deyðshóttan í sær sjálvum. Men einaferð síggja teir ein kóp. Teir fáa hann so nær flakanum, at teir fáa hendur á kópinum og drepa hann við einum nagla. Og tá kundu teir stilla tostan við blóðinum á kópinum! Og hetta mundi eiga lívið í teimum. Og eina ferð eydnast teimum at fáa samband við ein íslendskan útróðrarbát, og teir verða bjargaðir.

## "Flower of the Forest"

Í blaðnum "Sunnudagsskúlin" nr. 13, 31.mars 1974 greiðir Poul í Skorini m.a. soleiðis frá undir yvirskriftini "Ein vitnisburður":



*Poul í Skorini.*

Eg var til skips og fiskaði á hvørjum ári frá tí, eg var 14 ár. Í 1939 brast kríggj á, men eg helt áfram at fiska kortini. Fyrst í juli mánaða í 1942 fóru vit, 7 mans, til Íslands at keypa fisk við Vestmannasluppini "Flower of the Forest". Vit bíðaðu í einar tríggjar vikur, til vit fingu last. So varð farið avstað til Aberdeen at selja. Ferðin gekk væl, til vit 20.juli vóru staddir umleið 100 fjórðingar vestan fyri Suðuroynna. Hendan dagin kl. 6 á kvøldið var ein spreinging har afturi í skipinum – ivaleyst ein mina og bresturin var so harður, at skipið skrædnaði har afturi og fór so illa at leka, at tað var ógjørligt at halda tí lens, og motorurin steðgaði eisini. Vit 7, sum við vóru, sóu, at ikki var hugsandi at gera annað, enn at seta bátin út og tað skjótt. Vit høvdu bert ein pinkulítlan bát, bert 8-9 alin langur, ein sokallaður rytubátur. Vit komu allir sjey í bátin og róðu beinanvegin eitt sindur burtur frá skipinum. Tað vardi bert 20 minuttir til skipið sakk.

Báturin var hampiliga væl útgjørdur og hevði eisini segl. Nú vildi so væl til, at vindurin lá beint á Føroyar. Tí varð roynt at sigla, hóast veðrið var sjaskut, og vit ofta fingu so nógvan sjógv inn í bátin, so oysast mátti av øllum alvi. Tá vit høvdu siglt í 12 tímar, stilti av, og so varð farið at rógva. Hetta hendi sum sagt kl 6 á kvøldi, so náttin var sera óhugnalig.

Tá vit høvdu siglt og róð í 30 tímar komu vit til lands í Sumba, móðir og útlúgvaðir. Vit blivu væl móttiknir av sumbingum, sum hjálptu okkum niðan frá, tí hjá summum knípti at ganga."

Víðari greiðir Poul frá, at tá hann var komin heim, var hann so illa fyri, at hann einki gjørdi eina tíð, tí hann var overvaður av túrinum.

Seinni sama summar, nevniliga 7. september, hendir tað, at pápi Poul, Rasmus, er ein av teimum sum sjólátst við "Tór 2". Og soleiðis vildi lagnan tað, at tað var Poul, sum átti kjansin við hesum skipi, men pápin var farin fyri hann hendan túrin og kom ikki aftur. Í síni frásøgn um hesa vanlukku greiddi Malmberg Simonsen, sum var ein av teimum trimum, sum bjargaðist, frá, at tað síðsta hann minnist Rasmus var, at hann lá í koyggjuni og las í Bíbliuni.

Poul andaðist í fjør 84 ára gamal.

Skipari var Petur á Steig, og tað vóru J. E. Thomsens Eft, sum áttu skipið.

"Polarbjørn"

Tann 9. juli 1942 varð Vágsskipið "Polarbjørn" søkt av bumbum frá einum týskum flogfari 180 fjórðingar norðanfyri Føroyar. Tann triðja bumban fór gjøgnum skipið, sum sakk einar 6 minuttir seinni. Tveir av manningini vóru særdir, og aðrir vóru hvítklæddir. Í bátinum var eitt sindur av provianti, og hildu teir tvær spannir av vatni. Men tað vísti seg, at hol var komið á aðra spannina, og so var bert hin eftir. Teir høvdu langan tein heim, og teir vóru 53 tímar um ferðina. Teir komu til Trøllanes 11. juli, har teir vóru væl móttiknir. Til alla lukku var kyrt á Trøllanesi, tá teir komu hagar. Bert fáar tímar seinni gjørdist sjask lágt, og tað hevði komið illa við. Rutubáturin "Immanuel" varð sendur norður á Nes eftir manningini.

Tað var J. A. Hjelm í Vági, sum átti skipið og Klæmint Nicodemussen av Sandi var skipari.

"Sanna"

22. juli 1942 á middegi varð "Sanna" álopin av stórum týskum flogfari, tá hon var stødd 40 fjórðingar norðanfyri Føroyar. Manningin slapp sær í bjargingarbátin, og "Sanna" sakk knappar tveir tímar eftir at álopið byrjaði, og manningin setti kós móti Kallinum og komu teir á Fuglafjørð um midnátt.

"Sanna" hevði fyri føroyingar søguligan týdning, tí hon var fyrsta føroyska skipið, sum hevði siglt í Vesturheiminum við okkara flaggi á stong.

"Tór II"

Vit hava fyrr havt samrøðu við Malmberg Simonsen um ta einastandandi bjargingina av trimum av manningini á "Tór 2", sum 7. september 1942 varð torpederaður undir Íslandi og sum sakk í stundini. Fyrst komu teir frá torpederingina við lívinum, og síðan 36 tímar á lítlum báti undir vánaligum umstøðum til Vestmannaoyggjar.

"Misletoe"

Vit hava eisini fyrr greitt frá bjargingini av teimum seks monnunum á "Misletoe". Tað var skiparin á "Vilhelminu", Dánjal Johan Vestergaard, sum hevði "sæð" eina hond, sum vísti á eina aðra kós enn hana, teir sigldu. Hann gav so boð um at broyta kósina samsvarandi, hóast manningin helt hann vera øran. Og teir sigldu seg fram á "Misletoe", sum júst tá var blivin so illa bumbað av týskum flogfari, at skipið var við at søkka. Ein maður var raktur so meint, at hann doyði løtu seinni, og bátur av "Vilhelminu" tók manningina og eisini tann deyða mannin. Og tá kendi skiparin hondina aftur. Hon var nevniliga av tí deyða manninum.

Seinni doyði so ein annar maður, sum eisini var blivin raktur av týskum kúlum.



Vit høvdun skeivan tekst í seinasta blað. Hetta er Elsuba Brimheim. Hon er dóttir Onnu og Otto Brimheim, og er systir Maud Heinesen, sum vit hava havt minningarorð um í blaðnum. Hon flutti ung til Amerika.

## Minningarhald fyri teir sum fórust undir 2. heimsbardaga

Í ár eru liðin 60 ár liðin, síðan 2. heimsbardagi endaði. Hesin bardagin kostaði okkum dýrt í tapi av menniskjalívum á sjónum.

Í hesum sambandi verður allahalgannadagur, minningardagur teirra sjólatnu, í ár eisini ein serligur minningardagur fyri teir, sum fórust á sjónum undir krígnum.

Skráin fyri dagin er henda:

**Kl. 15.00:** Verður tann vanliga samkoman, sum plagar at vera kl. 10 á sjómansheiminum. Her tala Heri Joensen, prestur og løgmaður. Síðani verður farið niðan til minnisvarðan í Viðalundini, har løgmaður leggur krans.

**Kl. 20.00:** Minningargudstænasta í Havnar Kirkju. Bergur Debes Joensen prædikar. Aftaná gudstænastuna verða øll boðin til ein drekkamunn á Sjómansheiminum, Hotel Tórshavn.

**Vit bjóða teimum, sum sigldu undir krígnum, til eina samveru við døgurða *týsdagin tann 1. november kl. 17 á Sjómansheiminum, Hotel Tórshavn.***

Henda innbjóðing fevnir eisini um konur, einkjur og neyðug hjálparfólk. Skipað verður so fyri at farast kann á sjómansheimið aftaná minnisløtuna við minnisvarðan. Aftaná samveruna er møguligt at fara í kirkju.

Tey, sum hava hug at koma við til hesa samveru, eiga í seinasta lagi 28. oktober at boða Føroya Fiskimannafelag frá. Ringjast kann til tlf. 311569, faxast kann til 318769, og teldupostur kann sendast til: fo-fisk@post.olivant.fo

Hin Føroyska Sjómansmissiónin
Føroya Fiskimannafelag

**Gerst haldari fyri bert 200 krónur um árið**

# Bíðaðu eftir deyðanum

Mlamberg var so nær deyðanum, sum hugsast kann, tá "Tór 2" varð torpederaður. Vit høvdu eina samrøðu við hann fyrst í 2004, sum hann andaðist á heysti. Tað stóð framvegis á Malmberg, tá hann greiddi frá hendingini 7. september 1941. Hetta var tað sum Malmberg greiddi frá:



*Hendan myndin varð tikin í samband við samrøðuna við Malmberg. T.h. er Árni av Reyni, sum er abbasonur Jens av Reyni, sum var reiðari á "Tór 2".*

"Tá vit vóru 80 fjórðingar úr Vestmannaoyggjunum hendi tað. Tað hevur verið um kaffitíðina ella so. Eg hevði frívakt og hevði fingið mær kaffi. Nú hyggi eg aftur eftir, tí undir krígnum var líka umráðandi við skipi at hyggja aftureftir, sum at hyggja frameftir, tí vandin kundi vera báðumegin. Eg hugdi aftureftir og sá tornið á hesum kavbátinum. Helt, at eg skuldi fara upp á brúnna. Eg lænti kikaran og kikaði. Jú, tað var ein kavbátur. Eg segði so frá tí, eg sá. Men so fór eg fram í lugarið, og har vóru menn staddir.

Tað kann ein og hvør ímynda sær, at tað hevur ikki verið stuttligt at bíða eftir deyðanum. Ein kann faktisk siga tað so, at vit bíðaðu eftir deyðanum. Vit vistu, hvat ið kundi henda. Hetta var nevniliga ein kavbátur, sum jagstraði okkum. Tað kendist ein slík órógv á monnum. Men eg tørnaði kortini inn og sovnaði. So tá tað var gingin ein tíð, tað munnu hava verið einir tveir tímar, so hoyrdu vit nakað. Tað ljóðaði sum ein motorur. Tá var tað ein torpedo, sum varð skotin eftir okkum. Hon rakti ikki og fór framvið.

Ein rotta var umborð. Hon man eisini hava følt sær okkurt, tí nú kom hon knappliga í lugarið og rann millum beinini á monnunum. Men hon fekk frið.

Av monnunum minnist eg Rasmus Joensen, ein eldri eiðismann. Rasmus lá í koyggjuni og las í Bíbliuni.

Tá kom hann, sum hevði útkikk á stýrhústakinum niður í lugarið. Hetta var Jens Christian Hammer úr Søldarfirði. Tað var um 5-tíðina seinnapartin. Jens Christian tók hina føroysku heimamissónssangbókina og blaðaði upp og fór at syngja: "Jesus navnið aldri bliknar, slítist ei av tíðartonn". Hann sang hann at enda, og tá ið hann lat bókina aftur – eg síggi hann fyri mær enn, hóast tað eru meira enn 60 ár síðani – og hann legði bókina inn á hyllina aftur, tá brast! Alt gekk sera skjótt fyri seg. Hvussu skjótt, ja, tað hava ikki verið minuttir. Tað var, sum alt fór í knús, so sum skottið niður í lugarið. Tað tóktist, sum at alt gekk so skjótt fyri seg. Báturin rullaði á bakborð, og tá hann so aftur rullaði á stýriborð, fór hann. So skjótt gekk alt fyri seg. Helst er allur botnurin farin undan bátinum. Eg stóð á dúrkinum og datt á dúrkið. Ljósið fór, men tað var opin eldur í lugarinum, so eg sá so frægt, at eg fann. Tí fekk eg í tí sama vent mær móti leytaranum. Eg slapp upp og undan bakkanum og var sloppin aftur um hann, tá fór bakkin undir, so tað vóru sekund, so tað snúði seg um. Báturin sýgur so nógv niður, og tá hann søkkur, so sýgur hann okkum við. So hopið var næstan úti um at koma uppundan aftur.

Gud legði sín kjálka at mínum

Tá kom fram fyri meg: "Gud mín, Gud mín, hví er tú farin frá mær". Og tá, ja, tað ljóðar ótrúligt. Gud kom til mín og segði: "Eg eri hjá tær". Og hann legði sín mjúka kjálka afturat mínum. Hann var eisini mjúkur, kjálkin – og eg kenni sama fløvan enn."

Víðari greiddi Malmberg frá, at hann hevði lært at svimja í skúlanum, so hann fekk bart seg upp aftur í vatnskorpuna. Tá eydnaðist honum saman við tveimum øðrum, skiparan Óli Fossaberg og maskinmeistaran Jógvan Elias Jacobsen, at koma uppí skipsjolluna, og aftaná eina strævna og langa sigling komu teir inn í Vestmannaoyggjarnar.

Tey sum vilja lesa alla ta ótrúligu søguna hjá Malmberg kunnu fara inn á okkara heimasíðu, blað 312 og 313.



*"Tór II".*

# Hesir doyðu á sjónum í bardagaárunum

Vit hava her eitt yvirlit yvir teir av okkara landsmonnum, sum mistu lívið á sjónum bardagaárini 1939-45. Keldurnar eru bøkurnar Víkingasynir og Bumbur yvir Føroyar. Fyrst hava vit eitt yvirlit yvir teir, sum fórust við føroyskum skipum. Fyri hvørt skip er í yvirskriftini nevnt, tá tað fórst og síðan talið á monnum, sum umkomust. Síðan er ein stutt frágreiðing um skipið, og at enda nøvn og føðingardagur á teimum, sum ikki bóru boð í bý.

*Føroya Fólk setti kumlið eftir landsmenn sínar, ið fórust á sjónum bardagaárini 1939-1945 teimum til tøkk og ámninng.*




**"Aldan" · Juli 1940 · 6 menn**
25. juli 1940 fer "Aldan" av Vági við fiskafarmi til Onglands. Hon spyrst ikki aftur í aftur. Skipið var bygt í Dartmouth 1878. Eigari: J.A. Hjelm, Vágur.
Manning:
*Peter Jens Mohr Augustinussen*, skipari, Vágur. (f. 30.11.1896). · *Samuel Johannes Bech*, motorpassari, Vágur. (f. 21.08.1913). · *Peter Pauli Bech*, kokkur, Vágur. (f. 11.07.1904). · *Petur Juel Danielsen*, Vágur. (f. 30.07.1910). · *Edvard Sofus Lamhauge*, bestimaður, Vágur. (f. 04.02.1907). · *Petur Linjohn Kjærbæk*, Vágur. (f. 3.09.1916).

"Cheerful" · 17. okt. 1940 · 7 menn
Minusprongdist í Skopunarfirði.
Manning:
*Niels Peter Evensen*, skipari, Hvalba. (f. 06.-12.1910). · *Jacob Eliesar Holm*, bestimaður, Vágur. (f. 13.09.1906). · *Torkil Nattestad*, kokkur, Vágur. (f. 06.03.1922). · *Esmar Holm*, motorpassari, Nólsoy. (f. 20.02.1914). · *Ole Michael Nielsen Berg*, Hvalba. (f. 25.01.-1919). · *Niels Pauli Berg*, Hvalba. (f. 14.06.-1919). · *Sofus Jens Andreas Strøm*, Vágur. (f. 30.06.1895).

"Ekliptika" · mars 1941 · 8 menn
Fór úr Aberdeen 20. mars, men kom ikki vegin fram. Eigari var Jákup Heinesen, sum sjálvur var við.
Manning:
*Jacob Heinesen*, reiðari, Klaksvík. (f. 15.10.-1898). · *Eliesar Martin Jacob Poulsen*, skipari, Eiði. (f. 31.10.1902). · *Knud Peter Jacobsen*, bestimaður, Eiði. (f. 24.06.1896). · *Thorstein Dahl*, motorpassari, Klaksvík. (f. 19.09.1915). · *Joen Ziska Dahl*, motorpassari, Klaksvík. (f. 17.11.1907). · *Joen Oliver F. Ziska*, Klaksvík. (f. 24.11.1902). · *Christian Henry Olsen*, Gjógv. (f. 02.06.1913). · *Mikkel Mikkelsen*, Árnafjørð. (f. 07.06.1901).

"Milly" · mars 1941 · 7 menn
Sama dag sum "Ekliptika" fór "Milly" úr Aberdeen. Hon var seinast sædd 100 fjórðingar sunnanfyri Føroyar, og síðan visti eingin um skipið. Eigari her var eisini J.A. Hjelm, Vágur.
Manning:
*Isak Esbern Kirke*, skipari, Vágur. (f. 21.04.-1906). · *Simon Michael Poulsen*, bestimaður, Kirkja. (f. 15.01.1911). · *Poul Djurhuus*, motorpassari, Porkeri. (f. 30.07.1914). · *Joen Jacob Martin Olsen*, kokkur, Hvalba. (f. 21.-01.1905). · *Frithjof Juel Elverad Christiansen*, Vágur. (f. 01.09.1916). · *Poul Johannes Osval Djurhuus*, Víkarbyrgi. (f. 13.08.1917). · *Even Arnold Eyvindsson*, Hvalba. (f. 19.-09.1917).

"Guiding Star" · apríl 1941 · 7 menn
23. apríl 1941 fór hetta skip til Íslands úr Føroyum, men kom ikki vegin fram. Skipið varð bygt í 1882 í Grimsby og Mouritz Niclassen av Glyvrum átti tað.
Manning:
*Christian Martin Thorleifsson*, skipari, Strendur. (f. 25.11.1901). · *Peter Chr. Sofus Poulsen*, bestimaður, Skála. (f. 28.07.1912). · *Hans Esbern Joensen*, motorpassari, Vík. (f. 31.01.-1912). · *Hans David Hammer*, kokkur, Vík. (f. 13.01.1907). · *Peter Ludvig Martin Sofus Anthoniussen*, Morskranes. (f. 07.07.1918). · *Marius Frederik Berthelsen*, Innan Glyvur. (f. 27.11.1897). · *Daniel Johannes Anthon Joensen*, Hvítanes. (f. 28.01.1907).

"Emmanuel"
13. mai 1941 · 3 menn
Um middagin hendan dagin var skipið statt 18 fjórðingar vestanfyri Mykines á veg heim úr Íslandi. Tá fer ein týskur kavbátur at skjóta granatir eftir teimum. Teir vóru 8 mans við, og tað eydnaðist 5 teirra at koma í tann minna bátin, og at bjarga sær til lands. Hinar 3 menninar sást einki aftur til.
Hesir doyðu:
*Christian Emil Joensen*, skipari, Kvívík. (f. 24.08.1882). · *Johannes Oliver Sofus Johannesen*, Vestmanna. (f. 18.11.1917). · *Johan Marius Sofus Gaard*, Vestmanna. (f. 26.06.1904).

"Kristianna"
august 1941 · 7 menn
Teir fóru 9.august úr Íslandi til Onglands, men hvurvu á vegnum. Við skipunum var eisini eigarin Jóannes Johannesen úr Leirvík, sum vit hava umrøtt í frásøguni hjá dóttir hansara Doru. "Kristianna" var bygd 1879 í Grimsby.
Manning:
*Halvdan Johannes Joensen*, skipari, Skopun. (f. 18.07.1900). · *Poul Jensen*, bestimaður, Tórshavn. (f. 14.10.1886). · *Christian Johannes Frants Johannesen*, motorpassari, Leirvík. (f. 10.09.1915). · *Johannes Johannesen*, Leirvík. (f. 14.07.1878). · *Chrstian Fredrik Hentze*, Skopun. (f. 13.06.1892). · *Ole Christian Hansen*, Skopun. (f. 29.12.1894). · *Johannes Reinhold Jacobsen*, Tórshavn. (f. 20.-12.1920).

"Sjóborg"
13. august 1941 · 3 menn
"Sjóborg" forlisti á seg úr Íslandi til Bretlands. Tað var ein hvøllur brestur frammi við bógvin, og alt forskipið fór í smildur, og skiparin var slongdur til sjós. Tað eydnaðist 5 av manningini at bjarga sær í bátin, og teir høvdu 29 tímar róður inn til Sumbiar. Eigari var Doreus Hvidbro, Klaksvík.
Hesir doyðu:
*Joen Østerø*, maskinpassari, Mikladalur. (f. 18.04.1913). · *Herman Frederik Hermansen*, Hvalba. (f. 25.03.1887). · *Petur Sigurd Martin Hermansen*, kokkur, Hvalba. (f. 28.06.1920).

"Sólarris"
25. august 1941 · 5 menn
Skipið sprongdist av eini minu undir Íslandi og sakk eftir fáum minuttum. Tað eydnaðist 3 av monnunum at koma uppá ein flaka. Men ikki fyrr enn 78 tímar seinni vórðu teir bjargaðir.
Hesir doyðu:
*Johan Johansen*, bestimaður, Sandavágur. (f. 15.05.1884). · *Poul Andreas Durhuus*, motorpassari, Vestmanna. (f. 10.01.1881). · *Gudmund Sofinius Gudmundsen*, motorpassari, Vestmanna. (f. 13.10.1913). · *Hans Simonsen*, Sandavágur. (f. 29.05.1897). · *John Eskild Ferdinand Petersen*, Sandavágur. (f. 09.01.1914).

"Morning Star"
aug/sep 1941 · 7 menn
Horvin á veg til Íslands. D. P. Højgaard á Toftum átti skipið, sum var bygt í 1882 í Southtown.
Manningin:
*Andreas Esbern Jacobsen*, skipari, Strendur. (f. 24.07.1906). · *Jacob Edmund Frederik Jacobsen*, bestimaður, Slættanes. (f. 09.04.-1909). · *Magnus Ragnar Hansen*, motorpassari, Nes. (f. 19.01.1914). · *Simon Pauli Abrahamsen*, kokkur, Strendur. (f. 06.11.-1894). · *Hans Jacob Frederik Jacobsen*, Saltnes. (f. 14.12.1884). · *Salomon Martin Sofus Johansen*, Strendur. (f. 22.04.1917). · *Joen Rasmussen*, Norðskála. (f. 05.09.1925).

"Nýggjaberg"
mars 1942 · 21 menn
Hetta var størsta vanlukkan sum hendi undir krígnum við 21 sjólátnum. Sum við teimum flestu av skipunum hvarv "Nýggjaberg", og einki frættist aftur. Eigarar vóru pf. Múlin í Miðvági.
Manningin:
*Morten Johan Mortensen*, skipari, Argir. (f. 25.06.1883). · *Hans Poulsen*, stýrimaður, Tórshavn. (f. 10.11.1905). · *Christian Julius Thomassen*, stýrimaður, Miðvágur. (f. 19.06.1915). · *Thomas Svend Zachariassen*, maskinmeistari, Vestmanna. (f. 05.09.-1913). · *Samuel Jacob Joensen*, maskinmeistari, Miðvágur. (f. 02.02.1919). · *Jens Jacob Hansen*, kokkur, Miðvágur. (f. 19.08.-1906. · *Johannes Ferdinand Ellefsen*, kyndari, Miðvágur. (f. 12.09.1913). · *Esmar Elias Poulsen*, kyndari, Miðvágur. (f. 14.10 1913). · *Niels Jacob Nattestad*, Miðvágur. (f. 06.05.-1889). · *Ludvig Poulsen*, Miðvágur. (f. 23.-12.1893). · *Joen Henrik Johannesen*, Miðvágur. (f. 17.11.1895). · *Axel Sigmund Andreas Niclassen*, Miðvágur. (f. 06.08.1898). · *Poul Johan Frederik Magnussen*, Vágur. (f. 21.07.1899). · *Hjalmar Christian Frederik Reynstind*, Miðvágur. (f. 24.01.1903). · *Hjalmar Johansen*, Miðvágur. (f. 13.02.-1913). · *Niclas Niclasen*, Miðvágur. (f. 09.-01.1898). · *Ingvar Richard Albin á Ryggi*, Miðvágur. (f. 13.04.1914). · *Samuel Jacob Ewald Niclasen*, Miðvágur. (f. 29.03.1917). · *Hans Jørgensen*, Miðvágur. (f. 29.03.1917). · *Theodor Nicolaj Hansen*, Miðvágur. (f. 18.-10.1917). · *Niels Jacob Nielsen*, Sandavágur. (f. 08.06.1922).

"Vesturfarið"
mars/apríl 1942 · 8 menn
23. mars 1942 fór "Vesturfarið" av Hornafirði til Onglands. Skipið var væntað inn til Føroyar á vegnum, men tað sást ongantíð aftur. "Vesturfarið" var bygt í Frederikssund í 1930 og eigarar vóru Hans J. Guttesen og Abraham Jacobsen, Vestmanna.
Manningin:
*Samuel Andreas Johannesen*, skipari, Vestmanna. (f. 23.03.1887). · *Haldor Olaf Hans Edvard Joensen*, stýrimaður, Hvalvík. (f. 03.-12.1898). · *Haldan Malóm Chr. Haldansen*, motorpassari, Vestmanna, (f. 26.08.1912). · *Julius Andreas Sofus Olsen*, kokkur, Vestmanna. (f. 25.11.1900). · *Johannes Ferdinand Poulsen*, Vestmanna. (f. 08.07.1898). · *Johan Pauli Hilbert Jacobsen*, Vestmanna. (f. 20.01.1913). · *Pauli Poulsen*, Vestmanna. (f. 03.07.1920). · *Johannes Alfred Jacobsen*, Vestmanna. (f. 27.02.1921).

"Tór II" · 7. sept. 1942 · 18 menn
Hetta man vera ein tann mest umrødda vanlukkan undir krígnum takkað verið teirri undranarverdu bjargingini av 3 av manningini. Ein av hesum Malmberg Simonsen hevur greitt frá tilburðinum í FF-blaðnum.
Teir sum doyðu:
*Esmar Elias Christiansen*, stýrimaður, á Stykkinum. (f. 09.06.1903). · *Jens Sofus Vilhelm Jensen*, stýrimaður, á Stykkinum. (f. 18.-01.1905). · *Alfred Tage Hansen*, maskinmeistari, Kollafjørður. (f. 26.08.1919). · *Joen Peter Julius Martin Sofus Joensen*, kokkur, Langasandur. (f. 12.07.1892). · *Hans Peter Egholm*, Streymnes. (f.. 24.07.1921). · *Rasmus Andreas Frederik Joensen*, Eiði. (f. 18.07.-1889). · *Joen Poulsen*, Ljósá. (f. 30.05.1894). · *David Magnussen*, Kvívík. (f. 28.04.1896). · *Theodor Joensen*, Eiði. (f. 25.01.1903). · *Peter Sofus Ferdinand Poulsen*, (f. 17.03.-1905). · *Joen Jacob Chr. Jensen*, kyndari, á Stykkinum. (f. 15.09.1910). · *Martin Benedikt Sofus Hansen*, Leynar. (f. 27.09.1915). · *Joen Jacob Carl Sofus Samuelsen*, á Stykkinum. (f. 23.01.1916). · *Iver Salomon Johs. Sofus Iversen*, Kvívík. (f. 03.04.1910). · *Joen Pauli Sofus Dam*, Argir. (f. 22.06.1912). · *Jens Christian Hammer*, Søldafjørð. (f. 18.-10.1916). · *Frank Jacobsen*, Skopun. (f. 29.-06.1918). · *Samuel Peter Meinhardt Ernst Petersen*, Funning. (f. 21.08.1918).

"Gracie" · februar 1943 · 7 menn
Fór til Íslands, men kom ikki vegin fram. Tað var eitt slíkt ódnarveður, at hildið varð at her var talan um eitt sjóforlis, men tað er ikki óhugsandi, at skipið er farið av krígsávum. Th. J. Vilhelm í Vági átti skipið.
Manning:
*Ole Johan Thomasen*, skipari, Vágur. (f. 04.-11.1911). · *Henrik Johan Nicolaj Tausen*, bestimaður, Vágur. (f. 05.02.1899). · *Johan Carl Augustinussen*, motorpassari, Vágur. (f. 28.01.1896). · *Johan Andreasen*, Vík. (f. 13.-09.1915). · *Jacob Joensen*, Vágur. (f. 21.08.-1899). · *Joen Erik Martin Petersen*, Vík. (f. 26.08.1912). · *Pouliver Joensen*, Vík. (f. 02.-10.1919).

"Misletoe" · 9. juli 1943 · 2 menn
Skipið var álopið av týskum flogfari, og tveir av monnunum fingu deyðamein. Hinir vórðu bjargaðir umborð á "Vilhelminu". Hetta er ein frásøgn vit hava havt í summar. Ebba Müller átti skipið.
Hesir doyðu:
*Martin Theodor Jacobsen*, Glyvrar. (f. 21.03.-1892). · *Hilmar Magnus Pauli Egholm*, bestimaður, Hvalvík. (f. 17.07.1919).

"Verdandi" · des. 1944 · 15 menn
Hvarv á veg úr Íslandi til Føroya. Stóra talið á manningini er av teirri orsøk, at fleiri av teimum vóru ferðafólk, sum skuldu fara heim við.
Við vóru:
*Ole Larsen*, skipari, Oyrabakki. (f. 02.12.-1888). · *Jens Knudsen*, bestimaður, Glyvrar. (f. 28.01.1905). · *Frants Martin Davidsen*, motorpassari, Strendur. (f. 17.07.1916). · *Niels Martin Jacobsen*, kokkur, Streymnes. (f. 25.-01.1896). · *Christian Marius Sofus Frederik Højgaard*, Rituvík. (f. 20.10.1894. · *Olaf Jacob Larsen*, Fuglafjørð. (f. 24.08.-1908). · *Thomas Jacob Wensil Høj*, Strendur. (f. 28.09.1901). · *Olaf Martin Larsen*, Oyrabakki. (f. 19.09.1912). · *Samuel Peter*





*Petersen,* Rituvík. (f. 04.08.1915). · *Peter Andras Larsen,* Oyrabakki. (f. 23.06.1919). · *Johan Martin Oliver Anton Mikkelsen,* Syðrugøtu. (f. 21.05.1906). · *Daniel Jacob Henning Højgaard,* Toftir. (f. 28.03.1919). · *Ernst Peter Sofus Nickel Esmar Petersen,* Rituvík. (f. 01.08.1922). · *Hans Pauli Frederik Højgaard,* Rituvík. (f. 05.09 .1922). · *Bill Justinussen,* Glyvrar. (f. 02.03.1923).

## Í útlendskari sigling · 32 menn

*Jacob Michelsen,* Vágur, 27 ár. D. 28.11.1939 av krígsávum við "Hanna". · *J. Sigmund Jacobsen,* Nólsoy, 23 ár. D. 09.12.1939 av krígsávum við "Magnus" · *Sofus W. Rubeksen,* Tórshavn, 29 ár. D. 12.12.1939. Stýrimaður við "Port Arthur". · *Joen H. Johannesen,* Vestmanna, 19 ár. D. 21.01.1940 við "Tekla". · *Jens Ferdinand Poulsen,* Nólsoy, 18 ár. (d. 17.03.1940) við "Argentina". · *Eliesar M. Olsen,* Vágur, hovmeistari. D. 20.03.1940 við "Bodal". · *Sofus Andreassen,* Strendur, 33 ár, stýrimaður. D. 20.03.1940. · *Jacob Heinesen,* Klaksvík, 29 ár. · *Daniel Joensen,* Klaksvík, 51 ár. Hesir báðir fórust við bretskum trolara "Odena Victor" í aug. 1941. · *Magnus Jensen,* Nes, Vágur. D. 14.10.1941 við "Bonitu". · *Sigv. P. E. Poulsen,* Eiði, 26 ár. D. 12.04.1941. · *Alexander Olsen,* Vágur. D. 13.03.1941. · *Eli Egholm,* D. 1942. Fiskaði við báti sum var úr Esbjerg. · *Harald F. Olsen,* Tórshavn, stýrimaður. D. 14.01.1942 · *Ole P. Poulsen,* Syðrugøtu, 43 ár. · *Kaj Jensen,* Leirvík, 24 ár. Hesir báðir doyðu við Tennese 14.01.1942. · *Freilif Bech,* Tvøroyri, 23 ár. D. 28.09.1942. · *Joh. F. Bjørgheim,* Tórshavn. D. 7.12.1942 við "Nora Mærsk". · *Jørgen W. Bech,* Tórshavn, 23 ár, maskinmeistari. D. 1942 í Kyrrahavinum. · *Niclas J. Joensen,* Sumba, skipari. D. 25.09.1943. · Ole N. Evensen, Hvalba, 27 ár. · *Simon Svendsen,* Tórshavn, 43 ár. Hesir báðir doyðu 25.03.1943 við "Atland". · *Poul M. Jacobsen,* Tórshavn, stýrimaður. D 30.05.1943. · *Jóannes Danielsen,* Velbastaður, 27 ár. D. sept. 1943. · *J. Georg Dahl,* Dalur, 22 ár. D. 12.02.1944 í amerikanskari krígstænastu. · *Samuel P. Hansen,* Norðragøtu, 38 ár. D. 1945. · *Joen M. Gøthe,* Norðragøtu, 35 ár, telegrafistur. D. 11.04.-1945. · *Tobias Johannesen,* Dalur. D. jan. 1944. · *Daniel Fr. Hansen,* Mykines, 38 ár. D. 10.01.1945. · *C. Jacobsen,* Søldafjørð, 38 ár. D. 21.03.1941. · *P. S. Joensen,* Haraldssund. D. 1942. · *Sofus Hammershof,* Tvøroyri, 43 ár. D. 10.03.1944

Umframt hesar eru fleiri føroyingar búsitandi uttanlands sjólátnir. Tað kann verða nevnt, at í mun til fólkatalið munnu eins nógvir føroyingar verða deyðir við donskum skipum sum danir.

## Fórust av óhappi · 18 menn

*Edvard Hentze,* Sand, 34 ár, druknaði í Fleetwood, 03.12.1939. · *S. P. Chr. Petersen,* Tvøroyri, 43 ár, druknaði í Fleetwood, 05.04.-1941. · *Hanus Sørensen,* Húsavík, 32 ár. Sló út. · *Kristin S. Holm,* Nólsoy, 20 ár. Sló út av "Grundick". · *Ole J. Hansen,* Syðrugøtu, 15 ár. Sló út av "Polarbjørn" í 1940. · *Th. Johannesen,* Selatrað, 36 ár, druknaður í Aberdeen 03.02.1941. · *D. Jacobsen,* Svínoy, 35 ár. Druknaður í Klaksvík 21.08.1941. · *J. P. M. Petersen,* Selatrað, 23 ár, sló út 30.03.1942. · *Joh. Johannesen,* Skopun, 26 ár, sló út 15.-11.1942. · *Michael C. Jensen,* Vágur, sló út 13.04.1943. · *Jens C. F. Joensen,* Kollafjørður, 45 ár. Druknaði 13.07.1943 undir Íslandi. · *Thomas Hansen,* Leynar, 50 ár, sló út av "Skálaberg" 23.03.1944. · *Martin Smith,* Sumba, druknaður í Aberdeen 27.06.1944. · *Joen P. Olsen,* Vágur. Doyði 20.10.1944 av rakettapparati sum sprongdist. · *Hans J. Hansen,* Vestmanna, 49 ár, sló út 21.04.1945. · *Guttorm J. L. Zachariassen,* 33 ár, druknaður í Aberdeen 15.02.1945. · *Niels P. Jacobsen,* Sumba, 21 ár, sló út 05.05.1945 á ferð úr Íslandi. · *Joh. A. M. Remberg,* Froðba, 45 ár, sló út 18.02.-1945 á ferð úr Íslandi.

## Gingnir burtur á báti – 29 menn

Gingu burtur 19. november 1939 við grindabáti á ferð úr Hvannasundi til Oyndarfjarðar. Allir úr Oyndarfirði.

*Joen S. Rinkustein,* 42 ár. · *J. Hendrik E. Dahl,* 30 ár. · *Karl Thomsen,* 47 ár.

Gingu burtur við "Búgvanum" 21. februar 1940. Allir úr Porkeri.

*D. M. P. A. Jensen,* 44 ár · *J. J. M. E. Mortensen,* 31 ár. · *Peter E. Djurhuus,* 21 ár. · *J. J. M. E. Djurhuus,* 19 ár. · *D. J. Müller,* 32 ár. · *Johan E. M. Müller,* 26 ár. · *Poul O. M. Müller,* 25 ár. · *D. A. K. Petersen,* 16 ár.

Gingu burtur við grindabáti á ferð úr Funningsfirði til Oyrar. Báðir av Oyrabakka:

*Kristin Jacobsen,* 21 ár. · *Jonhardt Poulsen,* 19 ár.

Gingnir burtur á útróðrarbáti 13. mai 1942 ein landnyrðingsdag á heimferð frá Havnini út fyri Saksun:

*H. M. Rasmussen,* 45 ár · *Zacharias Joensen,* 52 ár. · *A. S. M. Joensen,* 25 ár. · *Ole J. J. Joensen,* 16 ár.
(Hesir fýra vóru av Norðskála).

*Joen Danielsen,* 66 ár. Druknaði í Leirvíksfirði 11.10.1943. · *Johannes Eliasen,* Klaksvík. Doyði á útróðri við Gardar 28.07.1942.

Gingu burtur fyri Borðoyanes 14. februar 1944. Allir úr Syðrugøtu. Hendingin er umrødd í seinasta FF-blað.

*Daniel P. Poulsen,* 57 ár. · *Poul Kristoffur Poulsen,* 65 ár. · *Andreas Peter Gregersen,* 26 ár.



*Hetta eru tær tríggjar talvurnar, sum eru á minnisvarðanum í viðarlundini. Har sæst m.a., at størsti missurin var í Vági við 20 monnum, Miðvágur við 16 monnum og Porkeri við 13 monnum.*

Tann 14. februar 1944 gekk eisini ein útróðrarbátur úr Porkeri burtur. Við honum fóru fýra porkeningar:

*Hans Godtfred,* 21 ár. · *Johannes Godtfred,* 19 ár. · *Daniel P. Vejhe,* 48 ár. · *Simon P. Vejhe,* 20 ár.

Gingnir burtur á útróðri í Íslandi 26.06.1944.

*Johan Bech,* Tvøroyri, 60 ár. · *Hans Eli Bech,* Tvøroyri, 23 ár. · *Henning Bech,* Tvøroyri, 21 ár.

Hetta gevur 210 nøvn. Umframt allar einkjurnar sótu um 300 faðirleys børn eftir. Tað skal eisini verða nevnt, at umframt tey 16 skipini, sum fórust við mannskaða, mistu føroyingar 22 skip, har øll manningin varð bjargað.

# Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

2. oktober
Stilli og pluss 2 stig. "Lómur" kom inn í kvøld at landa, teir hava um 50 tons inni, men teir hava havt nógva sigling, og so hava teir eisini ligið bakk fyri veður.

5. oktober
Minus 1,5 stig og stilli. "Polar Princess" kom inn at landa svartkalva í morgun. Teir hava gott og væl 730 tons inni.

8. oktober
–6,8 stig og stilli. "Polar Princess" fór nýggjan túr í gjárskvøldið, tástaðni var skipið útlossað. Í morgun kom "Markus" inn at millumlanda gott 300 tons; teir loysa frá landi aftur í kvøld.

Talan er um at "Markus" skal forlongjast við 12 m, so hann verður 82 m langur. Skipið skal skerast av framman fyri lastalúkuna. Grundin til hetta er, at oljan er so dýr, at teir mugu leggja um til tungolju, men ta tungoljuna kunnu teir ikki fáa her í Grønlandi, so tað verður í Íslandi, teir skulu bunkra. Teir koma at taka 1.200 tons av tungolju, og tað skuldi verið nóg mikið til 80 dagar. Tá kunnu teir fiska 1.000 tons av rækjum ímóti gott 700 tonsum nú.



*Rækjubáturin "Lómur" hevur verið verið 3 túrar seinastu 2 vikurnar, og hevur samanlagt fingið um 220 tons.*

9. oktober
Tað eru minus 4,2 stig og lot av eystri. "Lómur" kom inn at landa í morgun, teir hava um 80 tons inni. Teir loystu longu aftur í kvøld til nýggjan túr.

Teir flestu trolararnir royna her í Dýpinum, tað sær út sum um, at tað er tað frægasta í løtuni.

13. oktober
Pluss 1,5 stig, regn og stormur við vátakava av suðri. "Sermisuut" var inni her á veg til Manitsoq at landa. Teir hava fulla last eftir at hava roynt í 11 dagar.

Týsdagin 11. oktober fekk ein maður í Manitsoq ein stóran laks, sum vigaði 22 kg. Tað var ein prúður fiskur at síggja.

16. oktober
Minus 3,2 stig og stilli inni á. "Natarnaq" er inni í Nuuk og landar gott 460 tons. Slagið er gott eftir hesi tíðini.

17. oktober
Pluss 0,8 stig og stilli. "Akamalik" kom inn at landa í morgun, teir hava gott 380 tons inni.

18. oktober
Stilli og +0,8 stig. "Akamalik" fór nýggjan túr í morgun.

19. oktober
+0,1 stig og blikalogn. "Nanok Trawl" kom inn at landa knapt 400 tons í morgun.

Í gjár fingu smábátarnir nakrar grindahvalir, og eg havi fingið nøkur kók av teimum. Spikið sær heilt ónatúrliga feitt út. Teir hava fingið nakað av hvessingi, ella stórar delfinir, tær vóru svartar og gráar á liti. Tað sum eg hoyrdi, so vóru teir á støðd sum smáar delfinir.

20. oktober
+0,2 stig og blikalogn. "Lómur" kom inn at landa í morgun; teir hava gott 90 tons inni. Teir gera altíð skjótt av, og teir loystu longu aftur í kvøld – tí, sum teir siga: tað eru ongar rækjur við bolverkið!

"Nanok Trawl" fór út seinnapartin til nýggjan túr.

21. oktober
+0,1 stig og blikalogn. "Kinguk" kom inn at landa knapt 200 tons í morgun; sum eg skilti, so hava teir eini 100 tons av kvotu eftir her norðuri, men teir hava vist keypt eitt sindur aftrat, so teir fáa gjørt ein túr aftrat. Tað eru føroyingar, sum eiga "Kinguk" og "Aqivik". Skipini hava verið merkt til Sisimiut fyrr, men eigararnir fluttu síðan til Kanada.

23. oktober
–2,8 stig og blikalogn. "Helena L" kom i morgun inn at landa krabbar, teir hava gott 22 tons inni. Hetta er aðru ferð, teir eru her, eftir at hava havt nógv smá brek. Hin túrin høvdu teir um 20 tons. Tað er minni av krabba at fáa nú, og tað er longri ímillum landingarnar enn áður

# Hvørjir eru hesir?




Hendan myndin er av maskinmonnum ella motorpassarum í Havn heldur Haldane frá Fornminnissavninum má vera tikin seinast í '40 árunum.

Onkur teirra eru lættur at kenna t.d. nr. 2 er ein sonur Keldu-Símin á Strondum, nr. 9 er gamli elverksstjórin í Gundadali og nr. 13 er Ásmund Mikkelsen (Ásmund í Dávastovu).

Myndin er tikin frammanfyri húsini hjá Absalon Joensen á Landavegnum. Áðrenn tað átti systkinabarn hansara Jógvan við Stein Joensen húsini. Húsini eru ikki til longur. Tann seinasti sum búði í teimun var Páll Nolsøe, skjalavørður. Í dag er hetta partur av J.C. Svabosgøtu frammanfyri Málingarhandilin.




## Søk Gud fyrst – og stúranin hvørvur

Stúrið tí ikki fyri deginum í morgin.
*Matt. 6,34*

Einaferð vóru tað tvær vinkonir, sum vóru sera ymiskar av lyndi. Onnur var tunglynt, svartskygd og stúrdi fyri hvørjum degi. Hin var lættsint, bjartskygd, og gleddist yvir lívið og livdi í nú-inum.

Einaferð segði tann tunglynta við hina lættsintu: "Eg haldi ikki tað hóskar fyri teg at taka lívið so lætt og at vera so glað og lættsint. Tí, hvat um tú gerst sjúk í morgin? Hvat um tú kemur at missir arbeiðið? Hvat um tú kemur at missa onkran av tínum kæru? Hvat um tú mást flyta úr húsunum? Hvat um…?"

Tá breyt hin hana av og segði: "Eg leggi ikki petti í øll tíni "hvat um…". Eg livi nú og gleði meg yvir tað. Eingin kennir dagin í morgin. Hví skal eg so stúra fyri morgindeginum?"

Eitt er viðføtt lættsinni. Annað er í trúgv at læra, at taka hvønn dag av Guds hond.

Jesus segði: "Stúrið ikki fyri deginum í morgin". Fá orð eru so trupul at fylgja og hvíla í sum hesi.

Mong uppliva, at morgindagurin kastar myrkar skuggar inn yvir dagin og lívið í dag. Harvið tyngir morgindagurin og framtíðin um lívið beint nú.

Hugsaninnar hjá mongum leita frameftir, og royna at gera sær eina mynd av tí, ið koma skal, hóast framtíðin liggur líkasum í einum támi.

Hyggja vit aftureftir við hesum í huga, síggja vit, at mangan tóku vit feil, tá vit hugdu frameftir.

Beint frammanundan hevði Jesus sagt við lærusveinarnar, at teir ikki skuldu stúra fyri mati, drekka og klæðum, sum dagliga upptaka fólk.

So tekur Jesus samanum og nevnir eisini tað ókenda – morgindagin. "Stúrið tí ikki fyri deginum í morgin; tí at morgindagurin man stúra fyri sínum egna. Hvør dagur hevur nóg mikið í síni plágu."

Stúranin lammar trúnna og gleðina og stjelur hjartafriðin.

Vil Jesus, at tú als ikki skalt hugsa um morgindagin og framtíðina?

Jesus sigur: "Søkið fyrst Guds ríki og rættvísi hansara, so skal alt hetta verða tykkum givið umframt" ø.33.

Tann, sum søkir Gud fyrst, megnar at hugsa um morgindagin og um framtíðina – uttan at stúra. Hann veit, at alt hvílir í Guds faðirs almáttigu hond. Hann veit, hvat tær tørvar og vil geva tær tað.

*"Tann, sum søkir Guds ríki*
*sum tað fyrsta, vil skjótt søkja tað*
*sum tað einasta".*
*(Bengel)*


Jólaborðhald og dansur á Hotel Norð
Við føroya besta undirhaldara
Hilmar Jan Hansen
19. nov. 26. nov. 3. des. 10. des.
Borðhaldið byrjar kl. 19.00 við stóra jólaborðinum v/ fleiri enn 35 ymiskum heitum og køldum rættum.
Undir borðhaldinum verður felagssangur saman við góðum undirhaldi. Eftir borðhaldið verður dansur.
Kostnaður kr. 300,-
Ringið og bíleggið borð á tel. 217020
Møguleiki er at gista á hotellinum ella í summarhúsi. Avmarkað pláss.
Til dansin spæla
19. nov. All That Rain
26. nov. X-Rays
3. des. Jákup Marnar og Heini
10. des. Njál, Sólva og Mourits
Hotel Norð
Bussur koyrir av sandinum í Klaksvík kl. 18.30. Ferðaseðil íroknaður prísinum.
FO-750 Viðareiði · Føroyar
Tel. +298 451244
Fartel. +298 217020
Fax +298 451245
hotel@hotelnord.fo
www.hotelnord.fo


Ja takk!
Eg ynski at gerast haldari av FF-blaðnum fyri einans 200 krónur um árið
Verður sent ópostað - vit gjalda postgjald
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur:
FF-blaðið - postsmoga 58 - FO-110 Tórshavn
Tlf: 31 15 69 · Fax: 31 87 69
T-postur: ff-blad@post.olivant.fo


Føroya størsti veitari til ídnað og vinnu
Pakningur úr kartong, bylgjupappi og tjúkkum pappi, plastikki og øðrum tilfari til ídnaðarlig endamál.
Vit útvega eisini: Plastvørur · Pakkiútgerð Maskinur · Arbeiðsklæði Trygdarútgerð · Knívar · Tilsetning · Sekkir · Plattar · Vaskievni
Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari ...sjálvandi til besta prísin!
FARPACK
Smyrilsvegur 5 . P.O. Box 3099 . 110 Tórshavn . Faroe Islands
Tel +298 35 3000 . Fax +298 35 3010 . farpack@farpack.fo
www.farpack.fo


RONJA
RÁNSMANSDÓTTIR
Keyp ATGONGUMERKI á www.foroyabanki.fo
Føroyabankað spennandi!
FØROYA BANKI


Línubustir og goggar
Hondbundin føroysk línubust og hondgjørdir goggarar
Verða sendar um alt landið
Bílegging:
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97
Fløttislið (limur í Føroya blindafelag)

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569




**Eingin børn**
Presturin og prestafrúan fingu eingi børn, og tað vóru tey ógvuliga hørm um. Hinvegin gekk húshjálpin við tí áttanda barninum.
– Kunnu vit ikki sleppa at hava tað ófødda barnið búgvandi hjá okkum, tá ið tað kemur, spyr prestafrúan.
– Nei, barnið vil eg hava, men tú kanst fáa mannin...!

*****

**Í skúlanum**
Lærarin spyr lítla Sámal í fyrsta flokki:
– Dugir tú at svimja?
– Ja!
– Hvar hevur tú lært teg?
– Í svimjihylinum, sjálvsagt!

*****

**Reinur køkur**
– Tit munnu væl hava ein ógvuliga reinan køk her á matstovuni, sigur gesturin við tænaran.
– Takk fyri hasi góðu orðini. Eg skal bera tey víðari til køksleiðaran.
– Ja, ger tú tað – og sig við hann, at suppan smakkar av sápu!

*****

**Tað regnar...**
Ein kvinna ringdi til bilverkstaðið í Havn, tí nýggi bilur hennara startaði ikki.
– Hvar ert tú, spyr verkstaðsleiðarin.
– Í Klaksvík!
– So er tað helst vatn, sum er komið í forgassaran...!

*****

**Tað skotska**
Pápin sat uppi og bíðaði eftir soninum, sum var úti við gentu síni.
– Ná, segði pápin, tá ið sonurin kom aftur. Nú ruku nógvir pengar í kvøld?
– Nei, bara 10 krónur. Hon hevði ikki meiri...!

# 2 x Óli Jacobsen, formaður



*Óli Jacobsen, formaður, og Óli Jacobsen, formaður.*

Hóast fornavnið Óli og eftirnavnið Jacobsen eru sera vanlig, so er ikki so nógvir sum eita Óli Jacobsen, sum ein skuldi trú. Tað er einki løgið í, at tað er ein Óli Jacobsen, sum virkar sum fulltíðar nevndarformaður. Men tað er meira sjáldsamt, at teir eru tveir við sama starvi. Men tað finnast tveir Óli Jacobsen, sum báðir hava formansskap sum starv. Og fyri kortum hittust teir báðir. Og kunnu vit tí hesa ferð hava eina mynd, við myndatekstinum:

*Óli Jacobsen, formaður, og Óli Jacobsen, formaður.*

Men teirra formansskapur líkist annars ikki nógv. Annar er formaður í Føroya Fiskimannafelag, har virksemið er sera jarðbundið. Hin er nevndarformaður í New Tribes Mission, sum rekur trúboðaravirksemi um allan knøttin, og har føroyingar eisini eru partur av virkseminum.

Annars er um Ólarnar báðar at siga, at teir eru fermenningar, so teirra navn hevur sama upprruna. Abbarnir hjá báðum itu Óli Jákup Jacobsen, og teir vóru tískil systkinabørn. Og teir vóru uppkallaðir eftir einum felags pápabeiggja, sum kallaðist Óli Jákup, og sum gekk burtur 20. mars 1884 við "Nólsoyingi", sum var ein róðrarbátur.

Óli (á Grømma) Jacobsen fór sum ungur úr Føroyum í evangeliskt virksemi, og hann hevur virkað í mong ár á Filipsoyggjunum. Men seinastu nógvu árini hevur hann virkað í Florida, USA, í umsitingini hjá NTM, og hann gjørdist sum nevnt nevndarformaður fyri nøkrum árum síðani. Tískil hevur hann ovastu ábyrgd av hesum virksemi, har størsti trupulleikin í løtuni er, at stjórnin í Venesuela er við at útihýsa trúboðarar hjá felagsskapinum.

Óli er giftur við amerikonsku Judy, sum dugur væl at tosa føroyskt! Tey eiga synirnar Don og Dan.



*Judy, Anna á Váli og Óli. Anna fyllir annars 85 ár 5.november. Vit ynskja henni hjartaliga tillukku.*

dagsins **MYND**




# Toskur á skúlabeinki

Í seinasta blað høvdu vit eina stuttliga søgu um tosk, sum hevði verið á "skúlabeinki". Royndirnar á Havgranskingarstovninum í Bergen hava víst, at tað ber væl til at læra tosk ymiskan atburð sum t.d. at finna sær føði. Hetta kann fáa týdning fyri aling av toski. Hinvegin er ulka ella krutt meira dølsk og tornom.

Vit hava í norska blaðnum MEA hjá Norges Fiskarlag funnið hesa stuttligu tekningina og hana seta vit sum dagsins mynd.